


ATLANTIC AIRWAYS

# Konsern- og árfrásøgn 2025

www.atlantic.fo

AVRIT

Skrásetingar nr.:
1223

Roknskapartíðarskeið:
01.01.2025 – 31.12.2025

Fundarstjóri:
Christian F. Andreasen

Ársfrásøgnin er góðkend á ársaðalfundi tann 23. apríl 2026

## Átekningar

Leiðsluátekning ........ 4

Átekning frá óheftum grannskoðara ........ 6

## Leiðslufrágreiðing

Upplýsingar um felagið ........ 8

Konsernyvirlit ........ 8

Høvuðstøl og lyklatøl fyri konsernina ........ 9

Leiðslufrágreiðing ........ 11

## Konsern- og ársroknskapur 1. januar – 31. desember 2025

Nýttur roknskaparháttur ........ 30

Rakstrarroknskapur ........ 38

Fíggjarstøða ........ 39

Eginognaruppgerð ........ 42

Pengastreymsuppgerð ........ 43

Notur ........ 44



Mynd: Nicolás Vera-Ortiz

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2025 hjá Atlantic Airways P/F.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, eginognaruppgerð og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2025 hjá konsernini og felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá konsernini og felagnum umframt av pengastreymunum hjá konsernini fyri roknskapar-árið 1. januar – 31. desember 2025.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

*Sørvágur, tann 20. mars 2026*

## STJÓRN

**Jóhanna á Bergi**
*forstjóri*

## NEVND

**Niels Heini Mortensen**
*formaður*

**Kaj Johannessen**
*næstformaður*

**Esther Dahl**

**Annika Larsen**

**Tommy Adrian H. Andreasen**

**Jens Eystein í Løðu**



Mynd: Nicolás Vera-Ortiz

# Til kapitaleigararnar í Atlantic Airways P/F

## NIÐURSTØÐA

Vit hava grannskoðað konsernroknskapin og ársroknskapin hjá Atlantic Airways P/F fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2025 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginognaruppgerð og notum fyri bæði konsernina og felagið umframt pengastreymsuppgerð fyri konsernina. Konsernroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2025 hjá konsernini og felagnum, av úrslitinum av virkseminum hjá konsernini og felagnum umframt av pengastreymunum hjá konsernini í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2025 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## GRUNDARLAG FYRI NIÐURSTØÐUNI

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyristandandi broti ‚Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin'. Vit eru óheft av konsernini samsvarandi altjóða reglunum hjá ‚International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

## ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV KONSERNROKNSKAPINUM OG ÁRSROKNSKAPINUM

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein konsernroknskap og ársroknskap, ið geva eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at konsernroknskapurin og ársroknskapurin kunnu gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið konsernroknskapurin og ársroknskapurin verða gjørdir, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera konsernroknskapin og ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka konsernina ella felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

## ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS AV AT GRANNSKOÐA KONSERNROKNSKAPIN OG ÁRSROKNSKAPIN

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin í síni heild ikki hava týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá ið slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í konsernroknskapinum og ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiði, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá ið talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt konsernroknskapin og ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í konsernroknskapinum og ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at konsernin og felagið ikki longur megna at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um konsernroknskapurin og ársroknskapurin vísa tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

- Fáa hóskandi og egnað grannskoðanarprógv fyri fíggjarligu upplýsingunum um fyritøkurnar ella handilsvirksemið í konsernini til tess at røkka eini niðurstøðu um konsernroknskapin. Vit hava ábyrgdina av at leiða, hava eftirlit við og at gera konserngrannskoðanina. Vit hava evstu ábyrgdina av grannskoðanarniðurstøðuni.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

## UMMÆLI AV LEIÐSLUFRÁGREIÐINGINI

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

*Tórshavn, tann 20. mars 2026*

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

*Hans Laksá*
*statsaut. revisor*

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

### FELAGIÐ

P/F Atlantic Airways
Flogvøllurin
FO-380 Sørvágur

| | |
|---|---|
| Telefon: | +298 341000 |
| Heimasíða: | www.atlantic.fo |
| Skr.nr.: | 1223 |
| V-tal: | 379778 |
| Roknskaparár: | 1. januar – 31. desember |

### NEVND

Niels Heini Mortensen, formaður
Kaj Johannessen, næstformaður
Esther Dahl
Annika Larsen
Tommy Adrian Helmar Andreasen
Jens Eystein í Løðu

### STJÓRN

Jóhanna á Bergi, forstjóri

### GRANNSKOÐAN

P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki
Óðinshædd 13, Postbox 30
FO-110 Tórshavn

| | |
|---|---|
| Telefon: | 31 47 00 |
| Telefaks: | 35 17 01 |
| Teldupostur: | januar@januar.fo |
| Heimasíða: | www.januar.fo |

### DÓTTURFELØG

P/F Hotel Atlantic, P/F,
Flogvøllurin, 380 Sørvágur

P/F Ognarfelagið matr nr. 406b, P/F,
Flogvøllurin, 380 Sørvágur

### ASSOSIERAÐ FELØG

P/F Duty Free,
Flogvøllurin, 380 Sørvágur

P/F Greengate Incoming,
Niels Winthersgøta 5, 100 Tórshavn

P/F Gjáargarður,
Dalavegur 20, 476 Gjógv

P/F Ognarfelagið matr. Nr. 1332e,
Óðinshædd 11, 100 Tórshavn

## KONSERNYVIRLIT



| RAKSTRARROKNSKAPUR | 2025 (t.kr.) | 2024 (t.kr.) | 2023 (t.kr.) | 2022 (t.kr.) | 2021 (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettosøla | 946.806 | 921.343 | 885.015 | 740.135 | 446.822 |
| Úrslit av vanligum rakstri | -68.739 | 24.759 | 36.554 | 27.939 | -2.612 |
| Fíggjarligir postar, netto | -4.599 | 5.046 | 2.852 | -2.668 | -8.639 |
| **Ársúrslit** | **-56.247** | **27.295** | **35.844** | **20.991** | **-9.616** |
| **FÍGGJARSTØÐA** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 790.481 | 870.417 | 756.239 | 714.414 | 742.520 |
| Eginogn | 273.330 | 337.284 | 313.905 | 278.852 | 254.876 |
| **PENGASTREYMAR** | | | | | |
| Rakstrarvirksemi | 29.836 | 42.683 | 80.121 | 90.464 | 53.678 |
| Íløguvirksemi | -88.306 | -147.985 | -120.005 | 28.378 | -7.683 |
| Fíggjarvirksemi | -28.285 | 83.674 | -22.560 | -77.990 | -31.096 |
| **Pengastreymar tilsamans** | **-86.755** | **-21.628** | **-62.444** | **40.852** | **14.899** |
| **STARVSFÓLK** | | | | | |
| Ársverk | 307 | 280 | 257 | 226 | 184 |
| **LYKLATØL Í %** | | | | | |
| Rakstraravkast (EBIT-margin) | -7,3 | 2,7 | 4,1 | 3,8 | -0,6 |
| Gjaldførisevni | 60,9 | 118,2 | 115,3 | 163,2 | 165 |
| Eginognarpartur | 34,6 | 38,7 | 41,5 | 39 | 34,3 |
| Eginognaravkast | -18,4 | 8,4 | 12 | 7,9 | -3,8 |

*Høvuðs- og lyklatølini eru í størstan mun útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforeninigs ‚Anbefalinger & Nøgletal‘ og víkja bara frá hesum á nøkrum punktum.*

| | |
|---|---|
| Rakstraravkast (EBIT-margin) | Rakstrarúrslit (EBIT) x 100 / Nettoumsetningur |
| Gjaldførisevni | Ogn í umferð x 100 / Stuttfreistað skuld |
| Eginognarpartur | Eginogn ultimo x 100 / Ogn tilsamans ultimo |
| Eginognaravkast | Ársúrslit x 100 / Miðal eginogn |


Mynd: Shutterstock

# 1. Okkara uppruni og stevnumið

Atlantic Airways, ið varð stovnað í 1987, hevur staðið fyri støðugt at menna flogferðsluna til og úr Føroyum líka síðani fyrstu flogferðina tann 28. mars í 1988. Síðani 1995 hevur felagið ment rutusambandið við Danmark munandi og lagt afturat beinleiðis rutur til Noregs, Íslands, Bretlands og Fraklands, umframt farleiðir til heitari lond. Felagið hevur samstundis áhaldandi gingið á odda at marknaðarføra Føroyar uttanlands og verið við at menna ferðavinnuna í Føroyum.

Síðan 1994 hevur felagið røkt tyrluflúgving til útoyggjar, og leiting og bjarging (SAR/HEMS) síðani 2001. Harumframt hevur Atlantic Airways veitt tænastur til øll oljufeløg, ið hava tikið lut í oljuleiting í føroyskum sjógvi.

Felagið hevur ment seg frá at vera eitt lítið felag við einum flogfari og avmarkaðum førleikum til eitt felag, sum rekur fleiri flogfør, tyrlur og ein altjóða simulatordepil, umframt at luttikið verður í hotellvinnu, menning av ferðavinnu, farmaflutningi og øðrum flutningsuppgávum. Í 2025 vóru flogførini fýra og tyrlurnar tvær í tali, og starvsfólkahópurin hjá Atlantic Airways taldi 229 ársverk.

Atlantic Airways hevur sum sítt fremsta mál at knýta Føroyar at umheiminum og knýta oyggjarnar saman og skapa tryggleika. Flogið verður fyri Føroyar við einum regluligum, smidligum og fjølbroyttum rutuneti og við tænastum við kappingarførum prísum. Felagið flýgur við framkomnari tøkni og útgerð og nýtir nútímans samskifti. Kundin er í miðdeplinum. Samskapað verður við kundar og samfelag um tænastur og upplivingar.

Hjá Atlantic Airways er trygdin í hásæti, stundvísi eitt mál, kundin í miðdeplinum, starvsfólkini dugnalig og tænastusinnað, og úrslitini skapa virði. Virkisøkir felagsins eru rutuflúgving og tyrlutænastur við Føroyum sum hornasteini, umframt leiguflúgving við tøkari orku.

Rutuflúgvingin er býtt sundur í Danmarkar-, NORÐ- og SÓL-leiðir, umframt farleiðir til París og London. Talið á lág-prísferðaseðlum er økt munandi seinnu árini, bæði til Danmarkar og á NORÐ-leiðunum. Við NORÐ-leiðunum er flogsambandið millum Føroyar og grannalondini, Ísland, Noreg og Skotland, bøtt. Tyrlutilbúgving og rutuflúgving til útoyggjar verða í dag røkt við nútímans tyrlum, ið hava hækkað tænastustigið til gagns fyri útoyggjar, heilsuverk, sjófólk og ferðafólk.

Atlantic Airways er ein týdningarmikil partur av samfelagnum, sum strembar eisini eftir at vera ein virðismikil og virdur partur av samfelagnum, ið skapar virði, førleikar og størv í Føroyum.

Síðani flogfelagið byrjaði sítt virksemi, hevur tað lagt dent á at útbúgva lokala arbeiðsmegi í Føroyum at átaka sær eina røð av størvum innan flogvinnu. Atlantic Airways hevur hesi árini útlært fleiri hundrað fólk sum mekanikarar, flogskiparar, flogternur, umframt hópin av øðrum størvum innan flogvinnu og fyrisiting.

# 2. Rakstur og búskaparfrágreiðing

Ársúrslitið í Atlantic Airways í 2025 gjørdist 56,2 mió. kr. í halli eftir skatt, samanborið við 27,3 mió. kr. í avlopi í 2024. Úrslitið áðrenn skatt varð 72,0 mió. kr. í halli í 2025 samanborið við 31,1 mió. kr. í avlopi í 2024. Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar (EBITDA) í Atlantic Airways var 3,7 mió. kr. í halli samanborið við 66,6 mió. kr. í avlopi í 2024. Søluinntøkur vóru 878,8 mió. kr. í 2025, sammett við 859,5 mió. kr. í 2024.

Úrslitið eftir skatt í konsernroknskapinum varð 56,2 mió. kr. í halli í 2025 samanborið við 27,3 mió. kr. í avlopi í 2024. Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar (EBITDA) í konsernini varð 3,5 mió. kr. í halli samanborið við 65,8 mió. kr. í avlopi í 2024.

### YVIRHÁLING AV NEO MOTORUM

Høvuðsorsøkin til stóra hallið í 2025 er, at framleiðarin av motorum í september 2024 innkallaði tvey av flogførum felagsins til yvirháling av motorum. NEO flogførini hava CFM LEAP-motorar, ið eru framleiddir av CFM International, sum er eitt 50/50 samstarv millum GE Aviation úr USA og Safran Aircraft Engines úr Frankaríki. LEAP-1A motorurin er serliga framleiddur til Airbus A320neo-familjuna við nýggjari tøkni, betri avrikum og lægri oljunýtslu, men annars líknandi viðlíkahaldsútreiðslum sum eldru A320ceo motorarnir. Fyrsti LEAP-1A motorurin varð latin einum flogfelagi í juli 2016.

CFM LEAP-motorarnir lúka øll trygdarkrøv. Hóast hetta kunnu avbjóðingar altíð verða við nýggjari tøkni, og í hesum føri hevði tað við sær, at ávísir eykalutir skuldu skiftast fyrr enn væntað. Fram til mars 2025 eru umleið 670 flogfør av slagnum A320neo og A321neo innkallað til yvirháling av motorum. Atlantic Airways hevur tvey flogfør, ið hava hesar motorarnar, og av teimum tilsamans fýra motorunum á hesum báðum flogførunum, vórðu tríggir innkallaðir til yvirháling. Tveir av motorunum hava verið á verkstað í 2025, og tann triðji skal á verkstað í 2027.

Sama um flogfeløg eiga ella leiga flogfør og motorar, er tað altíð flogfelagið, ið hevur alla ábyrgd av rakstrar- og viðlíkahaldskostnaði. Samlaði kostnaðurin av yvirháling av fyrstu tveimum motorunum hevur verið á leið 140 mió. kr. Motorframleiðarin hevur tó verið við til at rinda ein part av eyka útreiðslunum. Beinleiðis ávirkanin á raksturin í 2025 hevur verið á leið 72 mió. kr., umframt óbeinleiðis útreiðslur til leigu av øðrum flogførum fyri at minka mest møguligt um ávirkanina á ferðafólk, og aðrar eyka útreiðslur. Felagið hevur útreiðsluført allan kostnaðin av yvirhálingunum í 2025.

Hóast stóru avbjóðingarnar við NEO motorunum hevur Atlantic Airways megnað at havt støðugt virksemi, soleiðis at ferðafólk ikki hava verið stórvegis ávirkað av hesum.

Úrslit áðrenn skatt (kr. 1.000) *Móðurfelag*



**FRAMLEIÐSLA 2025**

Flogførini hjá Atlantic Airways vóru samanlagt 10.590 blokktímar á flogi í 2025, sammett við 11.009 blokktímar í 2024. Flogfør og tyrlur vóru samanlagt 11.413 blokktímar á flogi í 2025 sammett við 11.821 blokktímar í 2024.

Rutuflúgving stóð fyri 56% av samlaðu framleiðsluni í 2025, leiguflúgving 37% og tyrluflúgving 7% í 2025.

## Framleiðsla í blokktímum 2021-2025




## Hagtøl 2025

| FERÐAFÓLK | 2025 | 2024 | BROYTING | BROYTING % |
|---|---|---|---|---|
| Flogfør, rutuflúgving | 378.913 | 368.696 | 10.217 | 3% |
| Tyrla | 10.665 | 10.973 | -308 | -3% |
| Leiguflúgving | 165.506 | 173.795 | -8.289 | -5% |

| FLOGTÍMAR (BLOKK) | TÍMAR | TÍMAR | TÍMAR | % |
|---|---|---|---|---|
| Flogfør, rutuflúgving | 6.367 | 6.617 | -250 | -4% |
| Flogfør, leiguflúgving | 4.223 | 4.392 | -169 | -4% |
| **Flogfør tilsamans** | **10.590** | **11.009** | **-419** | **-4%** |
| Tyrla | 823 | 812 | 11 | 1% |
| **Flogtímar tilsamans** | **11.413** | **11.821** | **-408** | **-3%** |

## Tal av ferðafólkum 2016 – 2025




**RUTUFLÚGVING**

Ferðafólkatalið við rutuflogførum felagsins í 2025 varð 378.913, sum eru 10.217 ferðafólk fleiri enn í 2024, tá ið 368.696 ferðafólk ferðaðust við rutuflogførunum. Hetta er ein vøkstur á 3%. Í 2025 varð flogið til 12 ferðamál, samanborið við 13 ferðamál í 2024, tá ið New York rutan eisini varð flogin. Árstíðarsveiggini í rutuflúgvingini eru stór. Tí verður í t.d. lágárstíð flogið 15 ferðir um vikuna til Danmarkar og upp í 35 ferðir um vikuna í háárstíð.

**LEIGUFLÚGVING**

Felagið leigar út avlopsorku til leiguflúgving fyri at betra um lønsemið. Talið av leigutímum í 2025 er eitt vet lægri enn í 2024. Flogførini hava flogið 4.223 leigutímar í 2025 í mun til 4.392 leigutímar í 2024. Leiguflúgvingin í 2025 hevur fevnt um flúgving fyri donsk ferðavinnufeløg og ad hoc flúgving kring Evropa.

## Flogtímar leiguflúgving *(blokk tímar)*




**TYRLUFLÚGVING**

Tyrluvirksemið í 2025 varð í høvuðsheitum leiting og bjarging fyri Landsstýrið og rutuflúgving til útoyggjar fyri Stand-faraskip Landsins við tveimum nútímans AW139 tyrlum. Tyrlurnar eru til reiðar til leiting, bjarging og sjúkraflutning (SAR/HEMS) alt samdøgrið allar dagar í árinum. Tyrlur felagsins vóru á flogi í 823 blokktímar í 2025 samanborið
við 812 blokktímar í 2024. Inntøkugrundarlagið í tyrlu-virkseminum er í høvuðsheitum sáttmálabundnar inntøkur

## Flogtímar tyrlur *(blokk tímar)*




fyri tyrlutilbúgving og útoyggjaflúgving.

Atlantic Airways hevur havt ein tíggju ára sáttmála við Føroya Landsstýrið um tyrlutilbúgving og innanoyggja flúgving til útoyggjar frá 2016 til og við 2025. Sáttmálin er

fyribils longdur við einum ári og avtalað er, at samráðingar um ein nýggjan langtíðarsáttmála fara í gongd í 2026.

Bjargingartyrlan varð boðsend 62 ferðir í 2025 samanborið við 54 ferðir í 2024. Miðal ‚scramble' tíðin, sum er tíðin frá, at tyrlan fær eitt útkall, til hon er á flogið, var 9,5 minuttir í 2025, og tíðin, frá at tyrlan fekk eitt útkall, til hon var á staðnum, var í miðal 31,47 minuttir í 2025. Felagið hevur røkt innanoyggja rutuflúgving til útoyggjar síðani 1994, og leiting og bjarging síðani byrjan í 2001.

## ATLANTIC AIRWAYS AVIATION ACADEMY

Í apríl 2025 varð nýggi simulatordepilin alment tikin í nýtslu. Nýtímans flogskúlin kann bjóða fyrsta floks simulator-venjingar, bæði til sínar egnu flogskiparar og eisini til flogskiparar úr øllum heiminum. Simulatordepilin hevur AW139 tyrlusimulator og A320 simulator, umframt ein HOIST TRAINER, har bjargarar kunnu venja saman við flogskiparum í AW139 simulatorinum.

AW139 simulatorurin kann veita framkomna og nútímans venjing, herundir innleiðandi typugóðkenning (type rating), re-current venjing og førleikakanningar bæði fyri VFR og IFR. Simulatorurin ger tað møguligt hjá flogskiparum at fáa ta góðkenning, sum krevst fyri at flúgva AW139 við EASA-góðkenning.

A320 EASA-góðkendi simulatorurin frá Sim International bjóðar framkomna og nútímans venjing til bæði til DRY og WET lease, umframt typugóðkenning (type rating) og re-current venjing.

HOIST TRAINER er sniðgivin til at venja bjargarar/hoist-operatørar við at nýta ‚virtual reality' tøkni, sum er framleidd av ThalesView™ Image Generation skipanini. Við ljóðmerkjum frá FFS og ‚virtual reality' tøkni veitir HOIST TRAINER eina heildarvenjing fyri hoist-operatørar.

Simulatordepilin er ein stór íløga fyri felagið, og miðað verður ímóti, at Atlantic Airways Aviation Academy fer at geva felagum íkast til raksturin innan fá ár. Í løtuni verður arbeitt við fáa langtíðaravtalur í lag til simulatordepilin. Ávísar avtalur eru komnar í lag, men tað tað tekur tíð at uppbyggja eina nýggja vinnu.

## ANNAÐ VIRKSEMI

Saman við Vága Floghavn eigur Atlantic Airways felagið P/F Duty Free, ið rekur tollfría sølu og kafe á flogvøllinum í Vágum.

Atlantic Airways eigur eisini dótturfelagið P/F Hotel Atlantic, ið rekur hotellið Hilton Garden Inn Faroe Islands í Havn í samstarvi við altjóða hotellketuna Hilton, og Hotel Vágar. Hilton Garden Inn hotellið hevur 130 kømur og fimm fundar- og ráðstevnuhølir, og Hotel Vágar hevur 25 kømur og tvey fundarhølir, umframt matstovuøki, ið eisini kann nýtast til veitslur og ráðstevnur. Hotellbygningin á Staravegnum í Havn leigar P/F Hotel Atlantic frá P/F Ognarfelagið matr. nr. 1332e, ið felagið eigur 40% av, saman við eftirlønarfelagnum LÍV, ið eigur 60%. Hotel Vágar leigar hotelbygningin frá P/F Ognarfelagið matr. nr. 406b, Sørvágur, ið er dótturfelag hjá Atlantic Airways.

Við rutuflogførum felagsins bjóðar Atlantic Airways loftvegis farma- og postflutning millum Føroyar og útheimin, sum er eitt gott íkast til rakstur felagsins. Hendan tænasta gevur serliga føroysku flutningsfeløgunum møguleika at fáa átrokandi farm skjótt fram.

## FLOTIN

Við árslok 2025 taldi flotin fýra flogfør. Tvey flogfør av slagnum Airbus A320neo og tvey av slagnum Airbus A320.

Felagið eigur sjálvt eitt av flogførunum og langtíðarleigar trý flogfør, harav tvey A320neo flogfør, ið hava í minsta lagi 15% lægri oljunýtslu og CO2 útlát enn onnur Airbus flogfør av somu støðd. Miðalaldurin á flogførunum er umleið níggju ár, sum er ein av yngstu flotunum í Evropa. Avtala er eisini gjørd við Airbus flogverksmiðjuna um tvey nýggj Airbus A320neo flogfør, ið eftir ætlan koma í flotan í 2028 og 2029.

Atlantic Airways brúkar mest framkomnu navigatiónstøknina RNP AR 0.1. Sum fyrsta flogfelag í heiminum fór felagið í 2014 undir at nýta navigatiónsskipanina sameint við innflúgvingarskipanini ILS (Instrument Landing System). Skipanin verður nýtt til Føroyaflúgvingina og ger, at flogførini hjá Atlantic Airways kunnu lenda í Vágum í munandi verri sýni enn áður. Íløgan í RNP AR 0.1 hevur seinastu árini havt við sær munandi hægri reglusemi í Vágum enn árini frammanundan.

| Floti við ársenda | Tal | Ogn | Framleiðsluár |
|---|---|---|---|
| A320neo | 2 | 0 | 2019–2020 |
| A320 | 2 | 1 | 2012–2016 |
| AW139 | 2 | 2 | 2015–2016 |

Atlantic Airways hevur tvær Leonardo AW139 tyrlur. AW139 tyrlurnar vórðu keyptar í ávikavist 2015 og 2016, og harvið er miðalaldurin á tyrluflotanum umleið tíggju ár.




| OY-RCK (INGÁLVUR) | S/N 8918 |
|---|---|
| Type: | Airbus 320-251N |




| OY-RCL (TITA) | S/N 10006 |
|---|---|
| Type: | Airbus 320-251N |




| OY-RCJ (WILLIAM) | S/N 7465 |
|---|---|
| Type: | Airbus 320-214 |




| OY-RCM (ELINBORG) | S/N 05084 |
|---|---|
| Type: | Airbus 320-214 |



| OY-HIH (RUTH) | SN: 31718 |
|---|---|
| Type: | Agusta Westland 139 |



| OY-HIL (SÁMAL) | SN: 31722 |
|---|---|
| Type: | Agusta Westland 139 |



Mynd: Bjørn Sjúrður Patursson

## BÚSKAPARLIGA GONGDIN, 1. JANUAR – 31. DESEMBER 2025

*Søla*

Atlantic Airways hevði 878,8 mió. kr. í samlaðum søluinntøkum í 2025 samanborið við 859,5 mió. kr. í 2024. Vøksturin er 19,3 mió. kr., ið millum annað stavar frá fleiri ferðafólkum.

Inntøka *(kr. 1.000) Móðurfelag*




*Rakstrarútreiðslur*

Rakstrarútreiðslur fyri móðurfelagið øktust við 72 mió. kr. í 2025 upp í 711 mió. kr. samanborið við 2024. Ein av størstu útreiðslupostum í flogvinnuni er brennievni. Í 2025 vóru samlaðu útreiðslurnar til brennievni, íroknað CO2 kvotu-keyp, 168 mió. kr. Felagið hevur lutvíst prístryggjað brennievnisnýtslu.

*Starvsfólkaútreiðslur*

Starvsfólkaútreiðslur vóru 171 mió. kr. í 2025, samanborið við 154 mió. kr. í 2024. Ársverkini vóru 229 í tali í 2025 sammett við 214 í 2025.

*Avskrivingar*

Av- og niðurskrivingar vóru netto 59 mió. kr. í 2025 samanborið við 36 mió. kr. í 2024.

*Fíggjarpostar*

Fíggjarpostar tilsamans vóru netto -9,6 mió. kr., íroknað úrslit frá assosieraðum feløgum, samanborið við 0,4 mió. kr. í 2024.

Úrslitið áðrenn skatt í 2025 gjørdist 72,0 mió. kr. í halli samanborið við 31,1 mió. kr. í avlopi í 2024. Ársúrslitið eftir skatt gjørdist 56,2 mió. kr. í halli samanborið við 27,3 mió. kr. í halli í 2024.

Renting av eginognini eftir skatt gjørdist negativ í 2025 samanborið við 8,1 prosent í 2024.

## FÍGGJARSTØÐA

*Ogn*

Støðisognin í felagnum er hækkað úr 562 mió. kr. upp í 623 mió. kr í 2025.

Ogn í umferð lækkaði úr 262 mió. kr. við ársbyrjan niður í 124 mió. kr. við ársenda 2025. Tøki peningurin í felagnum við ársenda 2025 var 51 mió. kr. samanborið við 138 mió. kr. við ársbyrjan. Tøki peningurin í konsernini við ársenda 2025 var 54 mió. kr. samanborið við 141 mió. kr. við ársbyrjan. Høvuðsorsøkin til lægra gjaldføri eru eyka útreiðslur til yvirháling av NEO motorum, umframt forútgjøld til nýggj flogfør.

*Eginogn*

Við árslok var eginognin í felagnum 273 mió. kr. og solvensprosentið 37%. Samanborið við ársbyrjan er eginognin minkað við 64 mió. kr., og solvensprosentið er lækkað við 4 prosentstigum.

*Skuld*

Við árslok var samlaða skuldin í felagnum 455 mió. kr. samanborið við 451 mió. kr. við árslok árið fyri. Langfreistaða skuldin er lækkað úr 268 mió. kr. niður í 240 mió. kr. við árslok 2024.

*Fíggjarstøða*

Fíggjarstøða felagsins javnvigaði 31. desember 2025 við 747 mió. kr.

## FRAMHALDANDI RAKSTUR (GOING CONCERN)

Nevnd og stjórn hava í sambandi við viðgerð av ársfrásøgn mett um niðurstøðu um framhaldandi rakstur (going concern assumption). Í hesum sambandi eru nevnd og stjórn komin til ta niðurstøðu, at á fráboðanardegnum fyriliggja eingi viðurskifti, ið sáa iva um, at felagið er ført fyri og fer at halda fram við framhaldandi rakstri (going concern) til í minsta lagi næsta roknskaparár. Tískil er ársroknskapurin settur upp við framhaldandi rakstri fyri eygað.

### BÝTI AV ÁRSÚRSLITI

Uppskotið um býtið av ársúrslitinum sæst í rakstrarroknskapinum.

### HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK

Eftir roknskaparlok er felagið meldað til Føroya Landfúta av Dátueftirlitinum, við kravi um sekt uppá 14 mió.kr. P/F Atlantic Airways er ikki samt við niðurstøðuni hjá Dátueftirlitinum.

Burtursæð frá omanfyrinevnda, er eftir roknskaparlok einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini

## Útlit fyri 2026

*Flogvinna og altjóða búskapur*

Sambært altjóða loftferðslufelagsskapinum, IATA (International Air Transport Association), øktist heimsflogferðslan øktist við 6,7% í 2025 í mun til 2024. Roknað verður við, at framgongdin í flogvinnuni fer at halda áfram í 2026.

Yvirskipað er gongdin í flogvinnuni vanliga tætt knýtt at búskaparligu gongdini í londunum, haðani ferðafólkini koma. Altjóða gjaldoyragrunnurin IMF væntar í seinastu frágreiðing síni, at heimsbúskapurin fer at økjast við 4,4% bæði í 2026 og 2027.

*Føroyski búskapurin*

Búskaparráðið metir, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan í leypandi prísum øktist við 3,3 % í 2025, sammett við 4,7 % í 2024 og 5,6 % í 2023. Meginparturin av vøkstrinum seinastu árini stavar framvegis í stóran mun frá prísvøkstri. Búskapurin er framvegis merktur av lágum arbeiðsloysi (1,0 % í januar 2026 sambært Hagstovu Føroya) og hægri livikostnaði, hóast prísvøksturin seinastu uppgerðirnar er munandi lægri enn undanfarin ár

Nýggjasta treystitalið frá Hagstovu Føroya vísir, at treystið er hækkað eitt vet. Føroysku húsarhaldini eru meira bjartskygd um búskaparstøðuna í Føroyum, handilsvinnan er meira bjartskygd, og tænastuvinnan sigur, at eftirspurningurin hevur verið betri í seinastuni, men væntað verður, at eftirspurningurin fer at minka komandi árið.

*Rutuflúgving*

Í 2026 bjóðar Atlantic Airways ferðafólki beinleiðis rutuflúgving til og úr Føroyum til 12 ymisk ferðamál: Keypmannahavn, Billund, Aalborg, Oslo, Reykjavík, Edinburgh, London, París, Barcelona, Mallorca, Gran Canaria og Tenerife. Dentur verður lagdur á at menna verandi ferðamál, tað er at økja um títtleikan og leingja sesongina á teimum ferðmálum, har vit ikki flúgva alt árið.

Roknað verður við einum ávísum vøkstri í ferðafólkatalinum í 2026 samanborið við 2025. Áhugin fyri Føroyum sum ferðamál er framvegis stórur, og tí verður væntað, at ferðafólkatalið næstu árini spakuliga fer at økjast.

*Leiguflúgving*

Leiguflúgving felagsins byggir á at gagnnýta tøka orku fyri at økja um lønsemið. Leiguvirksemið í 2026 verður á leið tað sama sum í 2025. Meginparturin av leiguvirkseminum er úr Danmark fyri danskar ferðaskrivstovur til ymisk ferðamál sunnanfyri. Harumframt verður flogið ad hoc flúgving, tá ið eftirspurningur er, og tøk orka er til tað.

*Tyrluflúgving*

Atlantic Airways knýtir oyggjarnar saman við rutuflúgving til útoyggjar og skapar tryggleika við nútímans tyrlutilbúgving. Við støði í 10 ára sáttmála við Føroya Landsstýri, sum gekk út við ársenda 2025, men longdur við einum ári, røkja tvær nútímans AW139 tyrlur innanoyggja flúgving og eru tøkar til leiting, bjarging og sjúkraflutning (SAR/HEMS) alt samdøgrið allar dagar í árinum. Virksemið í 2026 verður á leið á sama stigi sum í 2025.

*Simulatorvirksemi*

Arbeitt verður miðvíst við at fáa veruliga gongd á virksemið í nýggja flogskúlanum, Atlantic Airways Aviation Academy. Virksemið fer við tíðini at gerast ein nýggj vinna, ið fer at styrkja um búskaparligu støðu felagsins.

*Rakstrarútlit 2026*

Atlantic Airways væntar ein ávísan vøkstur í ferðafólkatalinum og á leið sama leiguvirksemið í 2026 samanborið við 2025. Um sæð verður burtur frá eyka útreiðslunum til yvirháling av motorum í 2025, verður roknað við sama rakstrarúrsliti í 2026 samanborið við undanfarnu árini.

Rakstrarúrslitið kann eisini ávirkast av vandanum fyri afturgongd í føroyska og evropeiska búskapinum, kappingarstøðuni, prísinum á brennievni, gjaldoyrabroytingum, príshækkingar innan flogvinnuna, heimsstøðuni, umhvørviskrøvum og øðrum váðum, ið nevndir eru í ársfrásøgnini undir váðastýring.

### SAMSTARV VIÐ VÁGA FLOGHAVN

Atlantic Airways er størsti kundi hjá Vága Floghavn, og tí er tað av stórum týdningi at hava eitt gott samstarv við Vága Floghavn.

Atlantic Airways og Vága Floghavn hava síðan 2014 samstarvað um tollfríu søluna á flogvøllinum. Síðan 2021 hevur virksemið hjá P/F Duty Free eisini fevnt um báðar kafeirnar á flogvøllinum.

Atlantic Airways hevur seinnu árini havt hølisavbjóðingar í sambandi við viðlíkahaldi av tí, at nýggju NEO flogførini ikki passa inn í verandi hangar. Tí hevur felagið gjørt avtalu við veitara í Billund um leigu av hangari. Atlantic Airways og Vága Floghavn samskifta í løtuni um at byggja nýggjan, størri hangar, sum vónandi verður veruleiki í næstu framtíð, soleiðis at øll flogfør og tyrlur felagins kunnu verða viðlíkahildin í Føroyum. Vága Floghavn hevur eisini sett gongd á fyrireikingarnar um at byggja nýggjan terminal. Tað er av stórum týdningi, at Atlantic Airways fær betri umstøður til m.a. handling, útgerð, reingerð, innskriving og kundatænastu.

Á flestu flogvøllum Atlantic Airways flýgur til eru ymiskar avsláttarskipanir, t.d. stórkundaavsláttur, avsláttur fyri at flúgva ávísar dagar, tá ið minni flúgving er og fyri at flúgva alt árið. Sum nevnt omanfyri, er Atlantic Airways størsti kundi hjá Vága Floghavn, og tí er tað av alstórum týdningi fyri kappingarførið hjá Atlantic Airways, at líknandi skipanir eisini fáast frá Vága Floghavn.

### SAMSTØRV VIÐ ONNUR FLOGFELØG

Atlantic Airways arbeiðir miðvíst við at styrkja samstarvið við onnur flogfeløg og fáa í lag fleiri samstarvsavtalur.

Atlantic Airways hevur síðan 2019 havt code share avtalu við KLM og Air France. Tað merkir, at fleiri av høvuðsfarleiðunum hjá Atlantic Airways eisini hava KLM og Air France flognummur, so ferðafólk við hesum feløgum eisini kunnu ferðast allan vegin til Føroya, og hetta inniber eisini, at Føroyar eru settar á sølulista á øllum ferðamálum hjá KLM og Air France. Nýggjastu samstarvsavtalurnar, sum Atlantic Airways hevur fingið í lag, eru code share avtalan við Icelandair, umframt interline avtalan við APG Airlines, sum hava fingið virknað í 2025.

## Yvirlit yvir verandi samstarvsavtalur




Mynd: Shutterstock

# 3. Eigaraviðurskifti

*Partapeningur*

Partapeningur felagsins er óbroyttur 104.500.000 kr. Partapeningurin er lutaður sundur í 1.045.000 partabrøv. Eingi partabrøv hava framíhjárættindi. Hvørt partabræv hevur eina atkvøðu.

*Partaeigarar*

Føroya Landsstýrið eigur 67% av partabrøvunum, meðan 33% av partabrøvunum eru egin partabrøv hjá felagnum.

*Vinningsbýti*

Nevndin leggur uppskot fyri ársaðalfund felagsins, ið verður í apríl 2026, at einki vinningsbýti verður útlutað partaeigaranum í Atlantic Airways. Einki vinningsbýti varð útlutað í 2025 fyri roknskaparárið 2024. Nevndin arbeiðir við at gera ein politikk viðvíkjandi útlutan av vinningsbýti.

*Kapital- og partabrævabygnaður*

Nevnd felagsins er av teirri áskoðan, at kapital- og partabrævabygnaður, kós og langtíðar virðisskapan felagsins tæna áhugamálum partaeigarans og felagsins.

# 4. Burðardygd

Atlantic Airways leggur stóran dent á burðardygd og hevur sum mál at flúgva so umhvørvisvinarliga sum gjørligt. Burðardygd er á dagsskrá í øllum deildum í felagnum, ið arbeiða miðvíst og áhaldandi við burðardyggu kósini sambært umhvørvispolitikki felagsins.

**CO2-ÚTLÁT FRÁ FLOGFØRUM**

Flogvinnan er bundin at oljunýtslu og harvið eisini CO2-útláti. Samlaða CO2-útláti hjá Atlantic Airways í 2025 var 74.558 tons. Av hesum stava 97,7% frá flogførum felagins.

Flogfeløg hava síðani 2012 verið partur av evropeisku CO2-útlátsskipanini ‚European Emission Trading Scheme,‘ stytt EU ETS. Flúgving til og úr Føroyum er ikki fevnd av skipanini í løtuni, men flúgving felagsins í og millum ES og EFTA-lond, í høvuðsheitum leiguflúgving, kemur undir EU ETS skipanina. Síðan 1. januar 2024 hava flogferðir millum ES/EFTA lond og kanarisku oyggjarnar, Madeira v.m. eisini verið fevndar av kvotaskipanini hjá ES. Neyðugt er hjá felagnum at keypa CO2-kvotur, sonevnd útlátsloyvi í sambandi við flúgving í ES og EFTA-londum. Felagið fær eisini avmarkaða kvotu ókeypis orsakað av søguligum rættindum. Avgerð er tikin í ES um, at skipanin við ókeypis

$CO_2$-útlát hjá Atlantic Airways í 2025




kvotum minkar niður í einki so líðandi næstu tvey árini. Marknaðurin fyri CO2-kvotum hevur søguliga verið óstøðugur. Seinastu fimm árini er prísurin á CO2-kvotum hækkaður úr umleið 8 EUR/tCO2 upp í umleið 80–90 EUR/tCO2.

Felagið er eisini fevnt av UK ETS CO2-útlátsskipanini hjá Stórabretlandi, ið fevnir um flúgving úr Stórabretlandi til ES og EFTA-lond, umframt CORSIA (Carbon Offsetting and Reduction Scheme for International Aviation), ið er marknaðarskipan fyri CO2-útlát frá altjóða flúgving. CORSIA skipanin byggir á, at vøkstur í útláti frá altjóða flogferðslu frá 2021 og frameftir verður mótroknað við keypi av sonevndum ‚Carbon Offsettings‘ (mótrokningarloyvum). Sambært CORSIA skipanini skal Atlantic Airways árini 2021 til og við 2029 keypa mótrokningarloyvi í tann mun, altjóða flogvinnan fer upp um útlátið í støðisárinum 2019. Mótrokningin verður grundað á egið útlát í støðisárinum, faldað við prosentvøkstrinum í útláti frá altjóða flogvinnuni í mun til støðisárið. Eftir 2029 fer skipanin eisini at taka hædd fyri vøkstrinum í útlátinum hjá einstaka flogfelagnum. Frá 2025 er felagið eisini fevnt av nýggju EU fuel skipanini (ReFuelEU).

Størsta átakið á burðardyggari leið er val av røttum flogførum. Felagið hevur í løtuni tvey Airbus A320neo flogfør, ið eru tey mest orkusparandi av sínum slagi. Felagið hevur gjørt avtalu um keyp av tveimum nýggjum A320 neo flogførum, sum væntandi verða partur av flotanum í ávikavist 2028 og 2029.

## $CO_2$-útlátið fyri hvørt flogsetur í 2008–2025 *(Rutuflúgving kilo/flogsetur)*




Felagið miðar eftir, at við tíðini vera øll flogførini av slagnum Airbus A320neo. Tó er eyka kostnaðurin av yvirháling av NEO motorunum eitt slag fyri bógvin í burðardyggu tilgongdini hjá flogfeløgum.

Við einum lutfalsliga nýggjum flota er brennievnisnýtslan lækkað munandi fyri hvørt flogsetur seinni árini. Airbus NEO flogførini hava í minsta lagi 15% lægri oljunýtslu enn onnur Airbus flogfør av somu stødd, tey larma minni, og við framkomnu fylgissveinatøknini RNP AR 0.1 verður betrað um reglusemið og harvið eisini sporini á umhvørvið. CO2-útlátið frá rutuflúgving í 2025 var 45.868 tons. Miðal CO2-útlátið fyri hvørt flogsetur var 86 kilo, sum er 42% lægri enn miðal CO2-útlátið fyri hvørt flogsetur í 2008. Miðal CO2-útlátið fyri hvørt flogsetur er hækkað eitt vet seinastu trý árini. Orsøkin til hetta er, at vit hava flogið lutfalsliga meira við CEO enn NEO flogførunum vegna viðlíkahald.

Átøk eru sett í verk við tí fyri eygað at minka um brennievnisnýtsluna á hvørjum einstøkum túri. Í samsvari við umhvørviskrøv frá ES-myndugleikum hevur Atlantic Airways síðani 2010 skrásett alla brennievnisnýtslu og CO2-útlát frá flogførum.

Fyri at minka um CO2-útlát mugu flogfeløg royna at minka um nýtsluna av ‚jet fuel', t.d. við at nýta ‚Sustainable Aviation Fuels' (SAF). IATA hevur víst á, at fleiri framleiðsluhættir eru góðkendir til SAF, og at SAF brennievnið virkar operativt sum Jet A-1 brennievnið. Stóra avbjóðingin í dag er tó útboð og prísur. SAF er framvegis nógv dýrari enn Jet A-1 brennievnið, og framleiðslan er avmarkað.

Felagið er harumframt fullgreitt yvir sína umhvørvisávirkan frá nýtslu av kemiskum evnum og eiturevnum, ið eru kravd til viðlíkahald av flogførum. Tó verður alt gjørt fyri at avmarka nýtsluna so nógv sum gjørligt. Eisini eru serligar mannagongdir fyri burturbeining av eiturevnum. Burturkast verður skilt í burturkast at brenna, at endurnýta (pappír), brennievni, smyrjioljur og lívrunnið tilfar, og hesi verða so endurnýtt ella burturbeind á ein skipaðan hátt fyri at minka skaða á umhvørvið.

Málið er at flúgva við ongum nettoútláti í 2050, ið altjóða loftferðslufelagsskapurin IATA (International Air Transport Association) hevur samtykt, og Atlantic Airways tekur undir við langtíðarætlanini hjá IATA við heitinum ‚Net Zero Roadmaps' um átøk til tess at náa málinum um einki nettoútlát í 2050.

### ONNUR ÁTØK Á BURÐARDYGGU LEIÐINI HJÁ ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways hevur seinnu árini gjørt fleiri átøk á burðardyggu leiðini. Umborð er allur pakningur í sambandi við vistveiting úr umhvørvisvinaligum tilfari, og møguleiki er hjá ferðafólki at bíleggja mat áðrenn fráferð. Hetta er við til at minka um ovurframleiðslu av mati eins og burturkasti umborð á flogførunum.

Talgilda undirhaldsskipanin Atlantic AirFi umborð á flogførunum hevur við sær, at tað ikki er neyðugt at hava dag- og vikubløð umborð longur, og við hesum verður minkað um pappírsnýtslu. Harumframt hava trappurnar hjá Atlanic Airways sólarpanel, sum eisini eru við til at minka um útlátið.

Nógv annað er eisini flutt yvir á talgildar pallar seinnu árini. Tað er ikki longur neyðugt at skriva út pappírsfráferðarkort, og súlukortini, ið fyrr vóru neyðug fyri at verða limur í trúfestisskipanini hjá Atlantic Airways, eru nú talgild, og harvið er framleiðslan av óneyðugum plastikkkortum steðgað.

## 5. Vitanarstig

Vitanarstigið í Atlantic Airways er týðandi fyri kappingarføri felagsins. Felagið leggur tí stóran dent á, at hóskandi vitan og arbeiðsroyndir eru á øllum økjum í felagnum. Umframt felagsins egnu innanhýsis ásetingar og krøv um útbúgving, førleikar og førleikamenning, áliggja felagnum eisini strong myndugleikakrøv um førleikamenning og viðlíkahald av førleikum hjá starvsfólki á flogdeildini, teknisku deildunum og í flogavgreiðsluni, umframt fyri onnur starvsfólk, ið hava beinleiðis ábyrgd mótvegis flogmyndugleikum.

Umframt høgt vitanarstig á framleiðslusíðuni leggur felagið eisini áherðslu á førleikar og førleikamenning innan fyrisiting og fyriskipan av flogfelagsrakstri, eitt nú innan góðsku, trygd, sølu, tænastu, fyriskipan og ráðlegging.

Atlantic Airways leggur stóran dent á starvsfólkanøgdsemi og trivnað. Ásannað verður, at nøgd og eldhugað starvsfólk eru meira virkin og munadygg í dagliga yrki sínum. Í 2024 varð kanning gjørd av arbeiðsumhvørvinum á øllum deildum í felagnum, bæði av sálarliga arbeiðsumhvørvinum og umhvørvinum á sjálvum arbeiðsstaðnum. Kanningin vísti, at starvsfólkanøgdsemið sum heild er høgt. Sum úrslit av kanningini verða ætlanir lagdar um batar á lyklaøkjum, har tað verður mett neyðugt.

Felagið er einasta ferðafólkaflogfelag við heimstaði í Føroyum og leggur tí dent á at útbúgva og førleikamenna staðbundna arbeiðsmegi og samstundis tryggja felagnum burðardygga arbeiðsmegi. Atlantic Airways metir tað verða eina kjarnuábyrgd at menna nýggj talent á føroyska arbeiðsmarknaðinum og hava tískil fleiri útbúgvingarmøguleikar í sjálvum felagnum, umframt at samstarvað verður við føroysk lesandi.

Atlantic Airways leggur eisini sera stóran dent á førleikamenning av starvsfólkunum, og málið er at útbúgva og varðveita dugnalig starvsfólk og vera fremsta val hjá best skikkaðu starvsfólkunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Førleikamenning tryggjar framhaldandi menning av hvørjum einstøkum starvsfólki og hevur jaliga ávirkan á starvsfólkanøgdsemið.

Førleikamenningin hjá felagnum er sett saman av kravdari útbúgving og viðlíkahaldi av førleikum hjá starvsfólki, umframt aðrari førleikamenning ásett av felagnum. Í 2025 hevði felagið 6,7 mió. kr. í útreiðslum til kravda og aðra førleikamenning.

## 6. Frágreiðing um virkisleiðslu

Í hesum parti er frágreiðing um virkisleiðslu felagsins. Frágreiðingin er partur av leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini fyri Atlantic Airways fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2025.

Eftir at felagið varð tikið av virðisbrævamarknaðunum í Keypmannahavn og Reykjavík, er ikki neyðugt hjá felagnum longur at taka støðu til leiðreglur fyri virkisleiðslu. Atlantic Airways hevur kortini valt at fylgja donsku leiðreglunum um virkisleiðslu og eftirlíka tilmælum, har tað letur seg gera. Eitt yvirlit við felagsins frágreiðing um virkisleiðslu í mun til donsku tilmælini sæst á heimasíðu felagsins *www.atlantic.fo/um-okkum/felagið/*

Galdandi donsku tilmælini um leiðreglur fyri virkisleiðslu vórðu givin út í desember 2020 og galda frá roknskaparárinum 2021. Fult yvirlit við donsku leiðreglunum fyri virkisleiðslu eru á heimasíðuni corporategovernance.dk

Niðanfyri verður greitt frá høvuðstættunum í virkisleiðslu felagsins.

### AÐALFUNDUR

Aðalfundurin er hægsti myndugleiki felagsins og verður hildin av partaeigarunum eftir ásetingunum í viðtøkum felagsins. Ársaðalfundur verður hildin hvørt ár, áðrenn apríl mánaður er lokin. Partaeigarar og teirra ráðgevar, umframt fjølmiðlar hava atgongd til aðalfundin.

### NEVNDIN

Nevndin sær til, at virksemi felagsins er skynsamliga fyriskipað, umframt at taka sær av heildarviðurskiftum felagsins og tryggjar sær, at áhugamál partaeigarans verða røkt á bestan hátt. Nevndin virkar fyri langtíðarmenning av felagnum og strembar eftir, at samsvar er millum fyriskipan og rakstur.

Nevndin fyri Atlantic Airways er mannað við seks limum, harav starvsfólkini hava valt tvey umboð. Val av starvsfólkavaldum nevndarlimum fer fram, sambært galdandi lóggávu á økinum, fjórða hvørt ár. Aðalfundurin velur fýra nevndarlimir á hvørjum ári.

Nevndarlimir í Atlantic Airways eiga at hava hóskandi førleikar og vera sinnaðir at nýta neyðuga orku og tíð til nevndararbeiðið. Hesi førleikaøki eiga helst at verða umboðað í nevndini: royndir í flogvinnu ella aðrari flutningsvinnu, viðkomandi vinnuligar royndir, leiðsluroyndir, ið samsvara støðd og endamál felagsins, royndir frá almennari umsiting, búskaparstýring, løgfrøðilig vitan og/ella royndir, strategiskur serkunnleiki og royndir við broytingarleiðslu. Hesir førleikar eru ikki einans yvirlit yvir

førleikar nevndarlimanna, men umboða eisini fjølbroytni nevndarinnar innan viðkomandi førleikar og vitan.

Leiklutur formansins er at skipa og leiða nevndarfundir, at røkja samband við stjórn, fyrireika fundarskrá og tryggja at nevndarlimir fáa fundartilfar í góðari tíð, áðrenn fundur verður hildin, kunna nevnd og tryggja at týdningarmiklastu mál felagsins verða viðgjørd, umframt tryggja at lógarásetingar verða hildnar og verða uttanhýsis talsmaður.

Høvuðsuppgávan hjá næstformanninum er at traðka til sum virkandi formaður, verður hetta neyðugt, umframt at verða virkin samstarvsfelagi formansins.

Nevndin setir ein ella fleiri stjórar at hava dagligu leiðslu felagsins um hendi.

Nevndin heldur fundir, tá ið nevndarformaðurin metir, tað verða neyðugt, ella tá ið ein av nevndarlimunum ella stjórnin setir fram ynski um hetta.

Nevndin hevur havt átta fundir í 2025.

### Niels Heini Mortensen, *Nevndarformaður*

*Føddur:* 28. oktober 1966

*Bústaður:* Traðavegur 12, FO-100 Tórshavn

*Tók við nevndarsessi:* Mars 2013

*Serligir førleikar:* Vinnuroyndir

*Starv:* Forstjóri í SMS P/F og NM Holding

*Royndir:* Danske Bank 1987–1992, P/F SMS 1992–

*Aðrir nevndarsessir:* P/F Hotel Atlantic (nevndarformaður), P/F Ognarfelagið matr. nr. 1332e (stjóri og nevndarlimur), P/F Ognarfelagið matr. nr. 406b, Sørvágur og P/F Duty Free

*Útbúgving:* Niels Brock Business School, Danske Bank

*Valskeið endar:* Apríl 2026

*Mettur at vera heftur at felagnum*

### Kaj Johannessen, *Næstformaður*

Nevndarformaður 1. januar – 8. mars í 2013
Næstformaður 2009–2012, og frá 14. mai 2013
Formaður í tilnevningarnevndini 2013
Formaður fyri grannskoðanarnevndini

*Føddur:* 8. november 1960

*Bústaður:* Inni á Fløtum 13, FO-180 Kaldbak

*Tók við nevndarsessi:* Apríl 2009

*Serligir førleikar:* Royndur í fíggjar- og roknskaparmálum, landsfyrisiting og vinnu.

*Royndir:* Stjóri í P/F Enniberg 2016–2024. Fulltrúi í Samferðslumálaráðnum 2015–2016. Fulltrúi í Fíggjarmálaráðnum frá 2013–2015. Fulltrúi í Innlendismálaráðnum 2008–2013. Bankafulltrúi í Føroya Banka 2000–2008. Limur í formanskapinum í Búskaparráðnum 2006–2009. Búskaparfrøðingur, Landsbanki Føroya 1993–2000 og stjóri Menningargrunnur Ídnaðarins 1990–1993. Próvdómari í búskapi á Fróðskaparsetur Føroya 2001–2014. Próvdómari í virkisbúskapi á Føroya Handilsskúla 2009–2013. Áður sitið í nevnd í Norriq Holding A/S, Investeringsselskabet af 5. oktober 2012 Aps, P/F Atlantic Petroleum, P/F SMS, P/F Miðlon, P/F Dvøljan og Maresco A/S.

*Aðrir nevndarsessir:* P/F Enniberg, P/F Farcod, P/F Havborg og P/F NECTO

*Útbúgving:* Kaj Johannesen er cand. merc. í búskaparfrøði og virkisleiðslu frá handilsháskúlanum í Keypmannahavn 1990 við denti á fíggjarmál, altjóða handil og við serkunnleika um fígging og búskaparstýring

*Valskeið endar:* Apríl 2026

*Mettur at vera heftur at felagnum*

### Esther Dahl, *Nevndarlimur*

*Fødd:* 20. september 1970

*Bústaður:* Hornavegur 27, FO-450 Oyri

*Tók við nevndarsessi:* Mai 2020

*Serligir førleikar:* Vinnuroyndir, arbeiðsmarknaðarviðurskifti

*Starv:* HR-, HTU- & samskiftisleiðari á Faroe Ship.

*Royndir:* HR- & HTU-leiðari á KSS Klaksvíkar sleipistøð 2019–2022. Ráðgevi í Føroya Arbeiðsgevarafelag 2005–2019 (serliga arbeiðsmarknaðurin, sáttmálasamráðingar og shipping). Fulltrúi á Løgmansskrivstovuni (uttanríkisdeildini) 2000–2005. Sendifólk Føroya í Bruxelles 1998–2000.

*Aðrir nevndarsessir:* Eingir

*Útbúgving:* Cand. negot.

*Valskeið endar:* Apríl 2026

*Mett at vera óheft at felagnum*

### Annika Larsen Black, *Nevndarlimur*

*Fødd:* 11. juni 1963

*Bústaður:* Grønalíð 9, FO-100 Tórshavn

*Tók við nevndarsessi:* Apríl 2021

*Serligir førleikar:* Vinnuroyndir, ferðavinna, fyrisiting

*Starv:* Fyrisiting, Fróðskaparsetur Føroya

*Royndir:* Fyrisiting Sernám 2023–2024, Yrkisdepilin 2021–2023, Samskipari Ferðaleiðaraútbúgving, Miðnám í Vestmanna 2017–2021, Vinnuferðavinna, MICE Faroe Islands 2016–2020, Søluleiðari, Smyril Line 2009–2013, Sølusamskipari Flogfelag Føroya 1995–2008, Laborantur Landsjúkrahúsið 1990–1995.

*Aðrir nevndarsessir:* Eingir

*Útbúgving:* Master í projektleiðslu og prosessoptimering, akademiútbúgving í leiðslu, ídnaðarlaborantur.

*Valskeið endar:* Apríl 2026

*Mett at vera óheft at felagnum*

### Tommy Andreasen, *Nevndarlimur (Starvsfólkaumboð)*

*Føddur:* 9. november 1985

*Bústaður:* Rygsgøta 13, FO-160 Argir

*Tók við nevndarsessi:* Apríl 2023

*Serligir førleikar:* Starvsfólk hjá Atlantic Airways

*Starv:* Flogskipari

*Royndir:* Starvsfólk hjá Atlantic Airways

*Aðrir nevndarsessir:* Eingir

*Útbúgving:* Flogskipari

*Valskeið endar:* Apríl 2027

*Mettur at vera heftur at felagnum sum starvsfólk í felagnum*

### Jens Eystein í Løðu, *Nevndarlimur (Starvsfólkaumboð)*

*Føddur:* 5. juli 1973

*Bústaður:* Smiðjuvegur 14, FO-386 Bøur

*Tók við nevndarsessi:* Apríl 2019

*Serligir førleikar:* Starvsfólk hjá Atlantic Airways

*Starv:* Safety Manager

*Royndir:* Starvsfólk hjá Atlantic Airways síðani 1994, tó undantikið 2000–2001.

*Aðrir nevndarsessir:* Eingir

*Útbúgving:* Flogmekanikari og sálarviðgeri (psykoterapeut)

*Valskeið endar:* Apríl 2027

*Mettur at vera heftur at felagnum sum starvsfólk í felagnum*

## GRANNSKOÐANARNEVND

Nevndin hevur ikki fyriskipað serstaka grannskoðanarnevnd. Nevndin tók avgerð á nevndarfundi í mars 2010 um, at nevndin sjálv, í samsvari við § 29 í føroysku grannskoðanarlógini, tekur sær av uppgávunum hjá grannskoðanarnevndini. Sostatt er øll nevndin eisini grannskoðanarnevnd. Kaj Johannessen er formaður fyri grannskoðanarnevndina.

## STJÓRN

Í stjórnini í Atlantic Airways sita forstjóri, sum er skrásettur stjóri, og fíggjarstjóri, ið hava ábyrgdina av dagliga rakstrinum. Forstjórin er eisini ‚Accountable Manager' við endaligu ábyrgdini mótvegis loftferðslumyndugleikunum.

**Jóhanna á Bergi,** *Forstjóri*

*Født:* 29. september 1970

*Bústaður:* Traðagøta 18, FO-700 Klaksvík

*Royndir:* Forstjóri í Atlantic Airways síðani september 2015. Stjóri í Faroe Ship P/F 2006–2015, Sølu- og marknaðarstjóri í JFK 1998–2006 og søluleiðari hjá Faroe Seafood 1994–1998.

*Aðrir nevndarsessir:* P/F Hotel Atlantic, Visit Faroe Islands P/F, Føroya Grunnurin, Norðoya Íløgufelag og P/F Norðoyatunnilin. Stjóri og nevndarlimur í P/F Ognarfelagið matr. nr. 406b, Sørvágur.

*Útbúgving:* MSc í Management frá Robert Gordon University 2004, umframt útbúgving frá The Danish School of Export and Marketing 1994.

## TEKNING AV FELAGNUM

Felagið verður teknað við undirskrift nevndarformansins og einum stjóra í felag ella við undirskrift av tveimum nevndarlimum í felag.

## SAMSÝNING TIL NEVND OG STJÓRN

Samsýningar til nevnd og stjórn verða ásettar við støði í samsýningarpolitikki felagsins. Galdandi samsýningarpolitikkur varð samtyktur av nevndini og ársaðalfundinum í apríl 2012.

Samsýningarpolitikkurin hevur sum mál at tryggja felagnum eina góða fyritøkuleiðslu og at skapa karmar fyri langtíðar virðisskapan til partaeigarar felagsins.

Nevndin er lønt við fastari samsýning, ið ikki er knýtt saman við nakrari avriksskipan. Samsýningin er ásett til 120.000 kr. um árið. Nevndarformaðurin fær tvífalda samsýning, meðan næstformaðurin fær eina og eina hálva samsýning. Samsýning fyri grannskoðanarnevndina er ásett til 20.000 kr. um árið. Formaðurin í grannskoðanarnevndini fær trífalda samsýning. Um nevndarlimur átekur sær serligar ad hoc uppgávur fyri felagið, ásetur nevndin fasta samsýning fyri slíkar uppgávur.

Nevndarsamsýningin er ásett við støði í førleikakrøvum, ábyrgd og avrikum hjá nevndarlimum og við atliti at virksemi felagsins og arbeiðsbyrðuni.

Stjórn felagsins er sett sambært stjórasáttmála. Gjørdar verða javnan eftirmetingar av lønini, herundir um tillagingar skulu gerast. Allar broytingar í galdandi stjórasáttmála skulu gerast skrivliga og góðkennast av nevnd felagsins.

Avgerandi fyri samsýning stjórnarinnar er, at hon tryggjar, at felagið framhaldandi er ført fyri at draga at sær og fasthalda stjórnarlimir við bestu førleikum. Samsýningin til stjórn felagsins verður samansett við støði í marknaðarsiðvenju og felagsins serliga tørvi.

Samsýningin til stjórnina kann fevna um fasta løn, kontantan bonus, umframt eftirløn. Samlaða støðið fyri føstu samsýningina verður ásett við atliti at marknaðarstøðinum, har millum annað støðd felagsins og rakstrargongdin verður tikin við í ásetanina. Í løtuni er samsýning til stjórn einans ásett við fastari løn og eftirløn, svarandi til ein ásettan part av føstu samsýningini.

## INNANHÝSIS EFTIRLIT OG VÁÐASTÝRING Í SAMBANDI VIÐ ÁRSFRÁSØGNINA

Nevnd og stjórn hava yvirskipaða ábyrgd fyri váðastýring felagsins og innanhýsis eftirliti í sambandi við uppsetan av roknskapi. Herundir ábyrgd fyri, at uppsetan av roknskapi er í samsvari við galdandi lóggávu og ásetingar. Eftirlits- og váðastýringsskipanir felagsins eru ætlaðar at eyðmerkja, stýra og minka um vandan fyri skeivleikum í ársroknskapinum og veita eina rímiliga, men tó ikki fullvísa, trygd fyri, at sleppast kann undan skeivari nýtslu av ognum, tapi og/ella týðandi skeivleikum í sambandi við uppsetan av roknskapi.

Nevnd og stjórn fyriskipa og góðkenna yvirskipaðan politikk, mannagongdir og eftirlit á týðandi økjum í sambandi við uppsetan av ársroknskapi.

Stjórnin hevur dagligu ábyrgdina fyri, at løgfrøðilig krøv og onnur krøv verða fylgd í sambandi við uppsetan av ársroknskapi og kunnar nevndina regluliga í hesum sambandi.

Nevndin kannar eftir árliga, og eftir tørvi, nýttan roknskaparhátt og møguligar broytingar, umframt roknskaparligar metingar í sambandi við uppsetan av ársfrásøgn.

Nevndin fyriskipar árliga eftirmeting av váðastýring felagsins og innanhýsis eftirliti, íroknað yvirskipaða váðameting í sambandi við uppsetan av ársroknskapi. Partur av hesi meting er at staðfesta váða fyri sviki og møguligar broytingar, ið neyðugar eru fyri at minka um ella burturbeina hendan váða.

Felagið hevur sett í verk mannagongd við regluligari kunning til nevnd felagsins hvønn mánað, ið inniheldur frágreiðing um frávik frá væntaðum úrslitum og høvuðstølum innan rakstarøkir felagsins.

## 7. Trygdarmentan

### TRYGDARSTÝRING

Trygdarstýring er ein skipaður háttur at stýra váðum og minka ella beina burtur trygdarváðar, bæði í rakstrarliga og tekniska umhvørvinum. Hendan framsøkna trygdarmannagongd er sett í verk í felagnum, so fráboðaðar hendingar verða kannaðar fyri at fáa møgulig brot fram í ljósmála, og neyðug stig kunnu setast í verk at forða fyri endurtøku. Endamálið er at flokka allar váðar, fráboða allar hendingar, meta um avleiddar váðar og minka teir so nógv sum gjørligt (‚As low as reasonably practicable,' stytt ALARP).

Umframt at eggja hvørjum einstøkum starvsfólki at fráboða allar hendingar og møguligar vandar, inniheldur skipanin eina rættvísa trygdarmentan ‚Just Safety Culture', sum inniber, at fráboðarin ella annar persónur ikki verður revsaður fyri nakað, ið annars ikki vildi komið fram í ljósmála, uttan so at talan er um lógarbrot, tilætlað ella groft ósketni.

Flight Data Monitoring (FDM) er alneyðugt fyri flogferðsluna. FDM-hagtøl verða skrásett á hvørjum flogtúri, so til ber at eyðmerkja møguligar vandar, ið liggja uttan fyri rakstrarmannagongdir. Út frá hagtølum og gongdini í hesum dátum ber til at síggja og meta um, hvat størri dentur skal leggjast á.

Í tekniska umhvørvinum verður stór áherðsla løgd á at læra av mistøkum og minka um mistøk av mannaávum, ið seta trygdina í rakstrarumhvørvinum í vanda. Hetta verður skipað umvegis skipanina, Maintenance Error Management System (MEMS). Í hesi skipan verða hendingar skrásettar og kannaðar til tess at læra av gjørdum mistøkum.

Eftir nógv ár við fráboðanum og kanningum hevur felagið staðfest fimm lyklaatburðir, sonevndar ‚Key Behaviours', í tekniska viðlíkahaldsarbeiðnum, ið økja um trygdina. Hesir lyklaatburðir eru:

- Far ígjøgnum viðlíkahaldkunningina (áðrenn byrjað verður)
- Skráset arbeiðsgongd (fyri at tryggja, at næsta vakt veit júst, hvat er gjørt)
- Serskilt eftirlit (eftir at stórar uppgávur eru framdar)
- Hav eyguni eftir gjørda arbeiðnum einaferð enn (eftir at uppgávan er gjørd fyri at vera fullvís í, at flogfarið kann fara á flog)
- Hugsa gjølla um uppgávuna (áðrenn farið verður í gongd við kritiska ella krevjandi uppgávu)

### COMPLIANCE (REGLUSTÝRING)

Compliance snýr seg um skyldu felagsins at tryggja, at øll flúgving og alt viðlíkahald av flogførum og tyrlum verða framd samsvarandi øllum lógarkrøvum, kravsetingum, tilráðingum og felagsins egnu ásetingum. Grundarlagið undir compliance stýringini er góðskupolitikkur felagsins.

Tríggjar ferðir árliga hevur felagið Safety Review Board-fundir (SRB), har mett verður um gongdina við compliance stýringini. Eftirmetingin er bygd á lyklavísitøl (Key Performance Indicators) úr øllum deildum, umframt óheftar góðskutrygdarfrágreiðingar frá innanhýsis og uttanhýsis eftirlitisfólki, íroknað eftirlitisfólki frá flogmyndugleikum.

# 8. Váðastýring

Týðandi váðar kunnu ávirka virksemi, rakstur og mál og mið felagsins. At staðfesta og taka støðu til váðar av ymiskum slag er týdningarmikil partur av virksemi hjá nevnd og stjórn. Við kunnleika um týðandi váðar og møguleikar í góðari tíð kann Atlantic Airways fremja neyðugar broytingar og tillagingar í virksemi felagsins. Stjórnin kunnar nevndina regluliga um gongdina á týdningarmiklum váðaøkjum.

### VANLIGIR OG SERSTAKIR VÁÐAR

Raksturin kann verða ávirkaður av gongdini í føroyska og altjóða búskapinum, eins og rakstur og fíggjarstøða felagsins kunnu ávirkast av kappingarstøðuni, oljuprísi, lønar- & prísvøkstri, prísi á CO2-kvotum, broytingum í útlátsskipanum, eftirspurningi eftir flogferðum, eftirspurningi á leigutúrum við flogførum og tyrlum, gjaldoyrabroytingum, kostnaðarstigi, veðri, øsku frá eldgosi, alheims farsóttum, operativum viðurskiftum og óhappum, myndugleikakrøvum, tøkni, fíggjarligum váða, kreditt- og gjaldførisváða.

Flogvinnan hevur lutfalsliga høgar flogútreiðslur knýttar at einstaka flogtúrinum, umframt høgar kapitalkostnaðir og aðrar fastar kostnaðir. Flogútreiðslurnar eru ikki beinleiðis ávirkaðar av ferðafólkatalinum í hvørjum flogfari. Tí hevur nýtslustigið, t.e. tali av ferðafólkum fyri hvønn túr, stóra ávirkan á vinningin fyri hvønn einstakan túr. Felagið fylgir neyvt við gongdini á nýtslustiginum og miðalinntøkuni fyri at tryggja ein skynsaman rakstur.

### BRENNIEVNI

Útreiðslur til brennievni eru millum størstu útreiðslur felagsins og hava sostatt stóra ávirkan á raksturin. Sveiggj í prísi á brennievni (jet fuel) kann ávirka brennievnisútreiðslur og rakstrarúrslit munandi. Útreiðslur til brennievni eru umleið ein fjórðingur av samlaðu rakstrarútreiðslunum. Brennievni til flogfør verður avroknað í amerikanskum dollarum og donskum krónum. Søguliga hava stórar broytingar verið í oljuprísinum, sum hava ávirkað raksturin ymiskt frá ári til ár.

Til tess at avmarka váðan hevur nevnd felagsins samtykt ein prístryggingarpolitik. Prístryggingar verða keyptar í donskum krónum. Prístrygging avmarkar ávirkanina frá príshækkingum og prísløkkingum. Sostatt fær felagið í høvuðsheitum ein hægri brennievnisprís, tá ið heimsmarknaðarprísurin lækkar, og ein lægri brennievnisprís, tá ið heimsmarknaðarprísurin hækkar.

### SEINKINGAR OG AVLÝSINGAR

Rakstur felagsins kann ávirkast av vánaligum veðurlíkindum (síðuvindi, turbulensi, mjørka, frosti og kava), øsku frá eldgosi og seinkingum. Serstakliga føroyska veðurlagið kann tarna flogferðsluni til og úr Føroyum. Í 2025 hevði felagið 12 mió. kr. í útreiðslum orsakað av avlýsingum, seinkingum og endurgjald til ferðafólk (EU261) samanborið við 15 mió. kr. í 2024. Nýmótans RNP AR 0.1 navigatiónsskipanin hjá felagnum hevur seinnu árini bøtt munandi um reglusemið og stundvísið og útreiðslur felagsins í sambandi við seinkingar og avlýsingar.

### GJALDOYRAVÁÐI

Broytingar í gjaldoyrakursum, serstakliga broytingar millum donsku krónuna og amerikanska dollaran, kunnu ávirka búskaparligu gongdina í felagnum. Útreiðslur til keyp og leigu av flogførum og trygging eins og meginparturin av viðlíkahaldi eru í høvuðsheitum í amerikanskum dollarum. Felagið metir um gjaldoyraváðan so hvørt, serliga millum donsku krónuna og amerikanska dollaran.

Felagið hevur prístryggingarpolitik, ið avmarkar váðan í sambandi við nýtslu av amerikanskum dollarum til leigu av flogførum.

### RENTUVÁÐI

Hækkandi renta kann ávirka felagið umvegis íløgur og fígging. Tann 31. desember 2025 var rentuberandi skuldin í móðurfelagnum 269 mió. kr. Solvensprosentið í móðurfelagnum var 34,6 um ársskiftið.

### GJALDSFØRISVÁÐI

Felagið hevur sum mál altíð at hava nóg mikið av gjaldføri. Gjaldførið hjá móðurfelagnum 31. desember 2025 var 51 mió. kr. og 54 mió. kr. í konsernini. Harumframt hevur felagið tilsøgn um upp til 30 mió. kr. í kreditti. Kredittur felagsins var óbrúktur tann 31. desember 2025. Gjaldføri felagsins við ársenda ávirkast av eyka útreiðslum í sambandi við yvirháling av NEO motorum umframt forútgjøldum til nýggju NEO flogførini. Gjaldførið verður mett at vera nøktandi. Tøkur peningur verður vanliga ávirkaður av árstíðarsveiggjum.

### KAPPINGARSTØÐA

Høvuðsinntøkukelda felagsins er rutuflúgving millum Føroyar og Keypmannahavn. Kappingarstøðan serstakliga við yvirskotskapasiteti og prískapping hevur seinastu árini ávirkað inntøkur og úrslit felagsins orsakað av sera hørðu kappingini við trý stór altjóða flogfeløg í háárstíð. Neilig ávirkan frá kappingarstøðuni á lønsemið felagsins kann eisini væntast í 2026.

# 9. Frágreiðing um samfelagsábyrgd (CSR)

Atlantic Airways miðar eftir at reka virksemið ábyrgdarfult, við gjøgnumskygni og leggur seg tí eftir at veita føroyska samfelagnum og ferðafólki kappingarførar tænastur, umframt at taka samfelagslig og umhvørvislig atlit.

## SAMAN MENNA VIT FØROYAR

Sum virkin luttakari í føroyska samfelagnum er Atlantic Airways til fyri at knýta Føroyar at umheiminum og fyri at knýta oyggjarnar saman og skapa tryggleika. Felagið flýgur fyri Føroyar við einum regluligum, smidligum og fjølbroyttum rutuneti og tænastum við kappingarførum prísum. Samskapað verður við kundar og samfelag um tænastur og upplivingar. Góða rutunetið ger, at okkara ferðandi, ung & eldri, sterk & veik, fólk & farmur, kunnu ferðast til vinnu & mentan, gaman & álvara og í gleði & sorg. Fyri okkum er av alstórum týdningi, at tað eru góð livikor at liva og virka í Føroyum. Tí hava vit áhaldandi samband við lokalar áhugabólkar fyri at finna loysnir og hugskot til, hvussu vit kunnu bøta um tænastur og útboð.

Vit taka eisini virknan lut í menningini av føroyska arbeiðsmarknaðinum við limaskapi okkara í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Ein sterkur føroyskur arbeiðsmarknaður skapar búskaparligt virksemi og størv, umframt flutningstørv til og úr Føroyum.

Atlantic Airways tekur somuleiðis virknan lut í menningini av altjóða brandingini av Føroyum uttanlands, tí vit síggja stórar vakstrarmøguleikar í føroyskari ferðavinnu, samstundis sum ferðavinnan eisini hevur vaksandi samfelagsbúskaparligan týdning.

## SPONSORAVTALUR OG STUÐUL

Atlantic Airways vil vera ein virkin luttakari í føroyska samfelagnum og stuðlar tí breitt á nógvum økjum. Tað verið seg ítrótti, mentan, ívertksetan o.m.ø. Felagið hevur í nógv ár arbeitt tætt saman við úrvalsítróttinum fyri at tryggja, at landsliðini hava góðar møguleikar at kappast uttanlands. Atlantic Airways stuðlar bæði ÍSF, Parasport og flestu sersambondunum, umframt landsliðum í fótbólti, hondbólti, flogbólti, svimjing og talvi.

Í mentanarligum høpi hevur Atlantic Airways í 10 ár verið partur av Loftbrúgv samstarvinum í samstarvi við onnur. Loftbrúgvin letur flogferðir til listafólk í sambandi við framførslur, sýningar og líknandi uttanlands. Í 2016 setti felagið eisini á stovn egna stuðlsskipan, Listaflog, hvørs endamál er at stuðla føroyskari list fíggjarliga og við ferðaseðlum á rutunetinum hjá felagnum í sambandi við listaligt arbeiði og/ella ávísa listaverkætlan. Stuðulin hækkaði úr 100.000 kr. um árið upp í 125.000 kr. í 2024 og verður latin eina ferð árliga, nevniliga tann 28. mars, ið er dagurin, Atlantic Airways fór á flog fyri fyrstu ferð. Atlantic Airways letur harumframt stuðul til flogferðir til flestu av føroysku tónleikafestivalunum hvørt ár.

Av øðrum samfelagsgagnligum samstørvum kunnu eisini nevnast samstarv við Megd um fylgjaraskipan, sjúkraflutning fyri Landssjúkrahúsið, Sveiggj, Oyggjaleikir 2027 o.m.a. Afturat teimum stóru samstørvunum innan ítrótt og mentan kemur eisini stuðul til einstakar verkætlanir av øllum handaslagi. Atlantic Airways var eisini fyrsta føroyska fyritøkan og fyrsta norðurlendska flogfelagið, sum í 2022 gjørdist limur í Sólblómuskipanini, sum hevur til endamáls at lætta um ferðina hjá teimum, ið hava eitt ósjónligt brek. Harumframt hevur Atlantic Airways samstarv við Verkstaðið Vón, sum m.a. framleiðir okkara viðførismerki.

Við SVEIGGJ-ferðaseðlum bjóðar Atlantic Airways ungdómi og lesandi ferðaseðlar fyri serprís. Soleiðis gerst tað bæði lættari og bíligari at ‚sveiggja‘ millum útbúgvingarlandið og heimlandið, og metir Atlantic Airways tað at vera av stórum týdningi at kunna knýta føroysk lesandi og ungdóm, ið býr uttanlands, nærri Føroyum. Soleiðis verður sambandið við Føroyar varðveitt, og kann hetta eisini síggjast sum ein liður í at tálma fráflytingini, ið nú aftur sæst í hagtølunum.

Eisini kann Sveiggj verða við til at gera tað meira áhugavert hjá ungum føroyingum at búgva og nema sær útbúgving í Føroyum, tí Sveiggj ger tað gjørligt at ferðast bíliga uttanlands – bæði frítíðarferðir, námsferðir og t.d. styttri útbúgvingarferðir. Í 2025 vóru 26.700 Sveiggj ferðaseðlar seldir á rutuneti felagsins, sum er ein øking á 7%, samanborið við 24.000 Sveiggj ferðaseðlar í 2024.

## ALMENT UM INNROKNING OG VIRÐISÁSETING

Ársfrásøgnin fyri Atlantic Airways P/F er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyr stór feløg í flokki C.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum (DKK).

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva konsernini fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr konsernini, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## UMROKNING AV FREMMANDUM GJALDOYRA

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## AVLEIDD FÍGGJARLIG AMBOÐ

Avleidd fíggjarlig amboð verða fyrstu ferð innroknað í fíggjarstøðuna til útveganarvirði og verða síðani virðisásett til dagsvirði. Positiv og negativ dagsvirði av avleiddu fíggjarligu amboðunum verða tikin við undir ávikavist ogn og skuld.

Broytingar í dagsvirðinum av avleiddu fíggjarligu amboðunum, ið eru ætlað til og lúka krøvini til tryggjan av dagsvirðinum av eini innroknaðari ogn ella skyldu, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin saman við møguligum broytingum í dagsvirðinum av tí tryggjaðu ognini ella skylduni.

Broytingar í dagsvirðinum av avleiddu fíggjarligu amboðunum, ið eru ætlað til og lúka krøvini til trygging av framtíðar ognum og skyldum, verða innroknaðar í áogn ella skuld og í eginognina.

Um framtíðartransaktiónin endar við innrokning av ogn ella skyldu, verða upphæddir, sum eru innroknaðar í eginognini, fluttar frá eginognini og verða innroknaðar í útveganarvirðið fyri ávíkavist ognina ella skylduna. Um framtíðartransaktiónin endar við inntøkum ella kostnaðum, verða upphæddir, sum eru innroknaðar í eginognini, fluttar til rakstrarroknskapin í tí tíðarskeiði, har tað tryggjaða ávirkar rakstrarroknskapin.

Fyri møgulig avleidd fíggjarlig amboð, ið ikki lúka krøvini fyri at verða viðgjørd sum tryggingaramboð, verða broytingar í dagsvirði innroknaðar so hvørt í rakstrarroknskapinum.

Broytingar í dagsvirðinum av avleiddum fíggjarligum amboðum, ið verða nýtt til trygging av nettoíløgum í sjálvstøðugum útlendskum atknýttum feløgum ella assosieraðum feløgum, verða innroknaðar beinleiðis í eginognina.




Mynd: Sverri Egholm

### KONSERNROKNSKAPURIN

Konsernroknskapurin fevnir um móðurfelagið Atlantic Airways P/F og atknýtt feløg, har Atlantic Airways P/F beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meira enn 50% av atkvøðurættindunum ella á annan hátt hevur avgerandi ávirkan. Fyritøkur, har konsernin eigur millum 20% og 50% av atkvøðurættindunum og hevur týðandi, men ikki avgerandi ávirkan, verða roknaðar sum assosieraðar fyritøkur, sí konsernyvirlitið.

Í konsolideringini verða allar konserninnanhýsis inntøkur og útreiðslur, partabrævaognir, innanhýsis millumverandi og vinningsbýti eliminerað. Somuleiðis verður staðfestur og óstaðfestur vinningur og tap frá handlum millum konsolideraðu feløgini eliminerað.

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða javnaðir við lutfalsliga partinum av handilsvirðinum á nettoognum og skyldum hjá atknýttu feløgunum á útveganardegnum.

Keyptar ella nýstovnaðar fyritøkur verða innroknaðar í konsernroknskapin frá útveganardegnum. Seldar ella avtiknar fyritøkur verða innroknaðar í konsolideraða rakstrarroknskapin fram til avhendingardagin. Samanberingartøl verða ikki rættað viðvíkjandi keyptum, seldum ella avtiknum fyritøkum.

Í sambandi við keyp av nýggjum fyritøkum verður yvirtøkuhátturin nýttur. Sostatt verða eyðmerktar ognir og skyldur hjá nýútvegaðu feløgunum virðisásett til dagsvirði á útveganardegnum. Kostnaðir til umskipanir, sum eru innroknaðir í yvirtiknu fyritøkuni áðrenn yvirtøkudagin, og sum ikki eru avtalaðir sum liður í yvirtøkuni, verða tiknir við í yvirtøkufíggjarstøðuna og eru harvið eisini partur av virðisásetanini av goodwill. Avgerðir um umskipanir, sum verða tiknar av yvirtiknu fyritøkuni, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin. Lagt verður upp fyri skattaávirkanini av gjørdu endurmetingunum.

Positivir munir (goodwill) millum útveganarvirðið og dagsvirðið á teimum eyðmerktu yvirtiknu ognunum og skyldunum, íroknað avsettar skyldur til umskipanir, verða innroknaðir undir immateriellari støðisogn og avskrivaðir javnt yvir raksturin við støði í metingum av fíggjarligu brúkstíðini. Negativir munir (negativt goodwill) verða innroknaðir sum inntøka í rakstrarroknskapinum á yvirtøkudegnum, tá vanligu krøvini fyri innrokning av inntøkum eru lokin.

## Rakstrarroknskapurin

### NETTOSØLA

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og við avsláttri í sambandi við søluna frádrignum.

### RAKSTRARKOSTNAÐUR

Rakstrarkostnaður fevnir um ferðafólka- og flogkostnað og kostnaðir til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir, tap uppá áogn og operationellar leasingkostnaðir.

### STARVSFÓLKAKOSTNAÐIR

Starvsfólkakostnaðir umfata løn, íroknað frítíðarløn og eftirløn, umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

### AV- OG NIÐURSKRIVINGAR

Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

### FÍGGJARLIGAR INNTØKUR OG KOSTNAÐIR

Fíggjarligir postar umfata rentur, staðfestan og ikki staðfestan kursvinning og tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum umframt amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

### INNTØKUR AV KAPITALPØRTUM Í ATKNÝTTUM FELØGUM OG ASSOSIERAÐUM FELØGUM

Í móðurfelags rakstrarroknskapinum verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá hvørjum einstøkum atknýttum felagi innroknaður, eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi, umframt frádrátt av avskrivingum av konserngoodwill.

Í bæði konsernsins og móðurfelags rakstrarroknskapi, verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá hvørjum einstøkum assosieraðum felagi innroknaður, eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi, umframt frádrátt av avskrivingum av konserngoodwill.

### SKATTUR AV ÁRSÚRSLITINUM

Skattur í árinum, ið er partafelagsskatturin fyri árið og broytingin í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapinum við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina verður bókaður á eginognina.

Felagið hevur valt at vera samskattað við atknýtt feløg. Felagið lýkur ásetingarnar í føroysku skattareglunum um samskatting av móðurfeløgum og teirra føroysku dótturfeløgum.

Skattavirðið av samskattingini verður býtt til feløgini í samtakinum í mun til teirra skattskyldugu inntøku ella hall. Feløg í samskattingini, sum nýta hall frá øðrum í samskattingini skulu átaka sær at gjalda eina upphædd til móðurfelagið, sum svarar til skattavirðið av nýttu hallunum, og móðurfelagið skal átaka sær at gjalda tilsvarandi upphædd til feløg, sum hava latið hall frá sær í sambandi við samskattingina. Dótturfeløg, hvørs inntøkuskattur verður goldin av móðurfelagnum, skulu átaka sær at gjalda eina upphædd svarandi til inntøkuskattin til móðurfelagið.

## Fíggjarstøðan

### IMMATERIELL STØÐISOGN

*Menningarverkætlanir, patent og loyvir*

Immateriell støðisogn, sum er ritbúnaður, verður innroknað til útveganarvirði frádrigið akkumuleraðar av- og niðurskrivingar. Immeteriell støðisogn verður avskrivað javnt yvir 3–5 ár.

### MATERIELL STØÐISOGN

Grundøki og bygningar verða virðisásett til útveganarvirði, við uppskrivingum løgdum afturat og frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Grundøki og bygningar verða uppskrivað við støði í óheftum metingum av dagsvirðinum við jøvnum millumbilum. Nettouppskrivingar í sambandi við dagsvirðisjavningar frádrigið útsettan skatt verða innroknaðar beinleiðis á eginognina og verða bundnar í einum serligum grunni fyri uppskrivingar. Nettoniðurskrivingar í sambandi við dagsvirðisjavningar verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við uppskrivingum til dagsvirði løgdum afturat, og frádrigið møguligt væntað restvirði eftir lokna brúkstíð. Avskrivingartíðarskeiðið og restvirði verður ásett í sambandi við útvegan og verður endurskoðað árliga. Er restvirði hægri enn roknskaparliga virði á ognini, støðgar avskrivingin.

Onnur materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur frádrigið møguligt væntað restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis er knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Jøvn avskriving verður framd grundað á meting av væntaðu brúkstíð og væntaðum restvirði hjá ognunum, sí niðanfyri:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Bygningar | 5–25 ár | 19,8 mió. kr. |
| Flogfør og tyrlur | 15–17 ár | 0 |
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 3–25 ár | 0 |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum søluprís við frádrátti av sølukostnaðum og roknskaparliga virðið á søludegnum. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavist aðrar rakstrarinntøkur og aðrir rakstrarkostnaðir.

### LEASINGSÁTTMÁLAR

Leasingsáttmálar vera mettir sum operationell leasing. Gjøld í sambandi við operationella leasing og aðrar leiguavtalur verða innroknað í rakstrarroknskapin yvir gildistíðina hjá sáttmálanum. Samlaða skuldin hjá konsernini viðvíkjandi operationellum leasingsáttmálum og leiguavtalum verður upplýst undir eventualskyldum.

## NIÐURSKRIVING AV STØÐISOGN

Hvørt ár verður mett um roknskaparligu virðini á bæði immateriellari og materiellari støðisogn, umframt kapitalpørtum í dótturfyritøkum og assosieraðum fyritøkum fyri at vita, um ábending er um, at tey eru minkað meir í virði enn tað, sum er avskrivað.

Eru ábendingar um virðisminkan, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettopengastreymunum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

Áður innroknaðar niðurskrivingar verða afturførdar, tá ið grundarlagið fyri niðurskrivingini ikki er longur. Niðurskriving viðvíkjandi goodwill verður ikki afturførd.

## AVLEIDD FÍGGJARLIG AMBOÐ

Dagsvirði á gjaldoyratryggingum er grundað á marknaðarprísin, um hann er tøkur. Er eingin marknaðarprísur tøkur, verður dagsvirði mett við at diskontera munin millum framtíðarprísin sambært trygginini, og núverandi framtíðarprís fyri restupphæddina við at nýta ein váðafrían rentusats grundað á statsobligatiónir.

## FÍGGJARLIG STØÐISOGN

### *Kapitalpartar í atknýttum feløgum og assosieraðum feløgum*

Kapitalpartar í atknýttum feløgum og assosieraðum feløgum verða innroknaðir í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av roknskaparliga innara virðinum hjá felagnum. Innara virðið verður uppgjørt eftir roknskaparháttinum hjá móðurfelagnum, eftir at lagt er upp fyri óásannaðum konserninnanhýsis vinningi og tapi, umframt frádrátti ella ískoyti av positivum ella negativum goodwill uppgjørt eftir yvirtøkuháttinum.

Atknýttar fyritøkur og assosieraðar fyritøkur við negativum roknskaparligum innara virði, verða innroknað uttan virði. Møgulig áogn hjá hesum feløgum verður niðurskrivað við lutfalsliga partinum hjá móðurfelagnum av tí negativa innara virðinum, í tann mun áognin verður mett at vera mist. Um roknskaparliga negativa innara virði er hægri enn áognin, verður restupphæddin innroknað undir avsettum skyldum í tann mun, móðurfelag hevur rættarliga ella ítøkiliga skyldu til at svara fyri negativu eginognini hjá hesum feløgum.

Nettouppskriving av kapitalpørtum í atknýttum feløgum og assosieraðum feløgum verður skrásett undir eginognini í tiltaksgrunninum fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum, í tann mun roknskaparliga virðið er hægri enn útveganarvirðið. Vinningsbýti frá atknýttum feløgum, ið kann væntast at vera samtykt, áðrenn hendan ársfrásøgnin verður góðkend, verður ikki bundið í innanvirðisgrunninum. Tiltaksgrunnurin verður javnaður við øðrum rørslum í eginognin í atknýttum feløgum og assosieraðum feløgum.

Keypt ella nýstovnað feløg verða í ársfrásøgnini innroknað frá útveganardegnum. Seld ella avtikin feløg verða innroknað fram til avhendingardagin.

Vinningur ella tap við avhendan av atknýttum feløgum og assosieraðum feløgum, verða uppgjørd sum munurin millum avhendingarupphæddina og roknskaparliga virðið á nettoognum á søludegnum íroknað írestandi konserngoodwill, umframt væntaðar kostnaðir frá sølu ella avtøku. Vinningur ella tap verða innroknað í rakstrarroknskapin undir fíggjarligum postum.

Í sambandi við keyp av nýggjum atknýttum fyritøkum og assosieraðum fyritøkum verður yvirtøkuhátturin nýttur. Sostatt verða ognir og skyldur hjá nýútvegaðu feløgunum virðisásett til dagsvirði útveganardagin. Avsetingar verða gjørdar fyri kostnaðir í sambandi við samtyktar umskipanir í nýútvegaða felagnum sum úrslit av yvirtøkuni. Hædd verður tikin fyri skattaávirkanini av broyttu metingunum.

Positivir munir (goodwill) millum útveganarvirði og dagsvirði av yvirtiknum ognum og skyldum, íroknað avsettar skyldur til umskipanir, verða innroknaðir undir kapitalpørtum í atknýttum feløgum og assosieraðum feløgum. Munurin verður avskrivaður yvir mettu fíggjarligu brúkstíðina, ið verður ásett eftir teimum royndum, ið leiðslan hevur á einstøku virkisøkjunum. Avskrivingartíðin er í mesta lagi 20 ár, og avskrivingartíðin er longst fyri strategist útvegað feløg við sterkari marknaðarstøðu og longum inntøkuprofili. Mett verður um roknskaparliga virðið av goodwill javnan, og tað verður niðurskrivað umvegis rakstrarroknskapin, tá roknskaparliga virðið er hægri enn væntaðar framtíðar nettoinntøkur frá tí felagnum ella tí virkseminum, ið goodwill er knýtt at.

## ONNUR VIRÐISBRØV OG KAPITALPARTAR

Onnur virðisbrøv og kapitalpartar, ið ikki eru skrásett á virðisbrævamarknaði, verða innroknað til kostprís. Um endurvinningarvirðið er lægri enn kostprísur, verður niðurskrivað til lægra virði.

## VØRUGOYMSLUR

Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vøru-

goymslum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virði.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og hjálpartilfari fevnir um keypsprís umframt flutningsgjald.

Útveganarvirðið av framleiddum liðugvørum og vørum í gerð umfatar útveganarvirði av rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaðum og óbeinleiðis framleiðslukostnaðum. Óbeinleiðis framleiðslukostnaðir fevna um óbeinleiðis tilfar og løn, umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkisbygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni. Harumframt umfatar posturin kostnaðir til at leiða og fyrisita framleiðsluna. Lánskostnaður verður ikki innroknaður í útveganarvirðið.

Nettorealisatiónsvirðið fyri vørugoymslur verður uppgjørt sum søluprísur, frádrigið kostnað til liðugtgerð og kostnað til at gjøgnumføra søluna. Nettorealisatiónsvirðið verður ásett við atliti at umsetiligheit, kuransi og gongdini á væntaðum søluprísi.

### ÁOGN

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

### TÍÐARAVMARKINGAR

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata útgjøld, sum viðvíkja kostnaðum komandi roknskaparárið.

### VIRÐISBRØV OG KAPITALPARTAR

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið eru innroknað sum ogn í umferð, verða virðisásett til dagsvirði (virðisbrævamarknaðarkurs) við roknskaparlok.

### TØKUR PENINGUR

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

### EGINOGN

*Grunnur fyri uppskrivingar*

Í grunni fyri uppskrivingum verða innroknaðar uppskrivingar av grundøkjum og bygningum frádrigið útsettan skatt. Grunnurin verður heilt ella partvíst uppleystur í sambandi við sølu av grundøkjum og bygningum, og minkar í sambandi við niðurskriving av hesum.

### GRUNNUR FYRI NETTOUPPSKRIVING EFTIR INNARAVIRÐISHÁTTINUM

Grunnur fyri nettouppskriving eftir innaravirðisháttinum fevnir um nettouppskrivingar av kapitalpørtum í dóttur- og assosieraðum fyritøkum í mun til útveganarvirði.

Grunnurin kann eliminerast við halli, avhending av kapitalpørtum og broyting í roknskaparligum metingum.

Grunnurin kann ikki innroknast við einari negativari upphædd.

### PARTAFELAGSSKATTUR OG ÚTSETTUR SKATTUR

Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

### SKULD

Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiseraða útveganarvirðið, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Onnur skuld verður tikin við til amortiseraða útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

### TÍÐARAVMARKINGAR

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir skuld, umfata inngjøld, sum viðvíkja inntøkum komandi roknskaparár.

# Pengastreymsuppgerð

Pengastreymsuppgerðin vísir pengastreymarnar hjá konsernini frá rakstri, íløgum og fígging fyri árið og broytingar í tøkum peningi umframt tøkan pening við roknskaparbyrjan og roknskaparlok.

Tá feløg verða keypt ella seld, verður gjaldførisávirkanin víst fyri seg undir pengastreymum frá íløgum. Í pengastreymsuppgerðini verða pengastreymar viðvíkjandi keyptum feløgum innroknaðir frá útveganardegnum, og pengastreymar viðvíkjandi seldum feløgum verða innroknaðir fram til søludagin.

### *Pengastreymar frá rakstri*

Pengastreymar frá rakstri verða gjørdir upp sum ársúrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarpostar, broyting í rakstrarfígging og goldnan partafelagsskatt.

### *Pengastreymar frá íløgum*

Pengastreymar frá íløgum umfata gjøld í sambandi við keyp og sølu av feløgum og virksemi umframt keyp og sølu av støðisogn.

### *Pengastreymar frá fígging*

Pengastreymar frá fígging umfata broytingar í støðd ella samanseting av felagskapitali og kostnaðir í hesum sambandi. Harumframt umfata pengastreymarnir lántøku, avdráttir av rentuberandi skuld og útgoldið vinningsbýti til eigararnar.

# Segmentupplýsingar

Upplýst verður um handilssegment og landafrøðiligar marknaðir. Segmentupplýsingarnar fylgja móðurfelags roknskaparhátti, váðum og innanhýsis fíggjarstýring.



Mynd: Klara Johannesen

| | | KONSERN | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|
| *Nota* | *(kr. 1.000)* | 2025 | 2024 | 2025 | 2024 |
| *1* | Nettosøla | 946.806 | 921.343 | 878.752 | 859.545 |
| | Rakstrarkostnaður | -746.428 | -674.769 | -711.577 | -639.235 |
| *3* | Starvsfólkakostnaðir | -203.883 | -180.728 | -170.843 | -153.741 |
| | **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar (EBITDA)** | **-3.505** | **65.846** | **-3.668** | **66.569** |
| | Av- og niðurskrivingar | -65.234 | -41.087 | -58.668 | -35.886 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarligar postar (EBIT)** | **-68.739** | **24.759** | **-62.336** | **30.683** |
| *4* | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 1.446 | 4.761 | 833 | 3.017 |
| *5* | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -18.846 | -11.300 | -17.247 | -8.984 |
| | Inntøkur frá kapitalpartum í atknýttum fyritøkum | 0 | 0 | -4.619 | -3.115 |
| | Inntøkur frá kapitalpartum í assosieraðum fyritøkum | 12.801 | 11.585 | 11.364 | 9.483 |
| | **Úrslit áðrenn skatt (EBT)** | **-73.338** | **29.805** | **-72.005** | **31.084** |
| *6* | Skattur av ársúrsliti | 17.091 | -2.509 | 15.758 | -3.789 |
| | **Ársúrslit** | **-56.247** | **27.295** | **-56.247** | **27.295** |
| | **UPPSKOT TIL BÝTI AV ÚRSLITI:** | | | | |
| | Flytast til flutt úrslit | | | 0 | 27.295 |
| | Flutt frá fluttum úrsliti | | | -56.247 | 0 |
| | **Býtt tilsamans** | | | **-56.247** | **27.295** |

| | | | KONSERN | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Nota* | *Ogn* | *(kr. 1.000)* | 2025 | 2024 | 2025 | 2024 |
| | **Støðisogn** | | | | | |
| 7 | Ritbúnaður | | 1.809 | 1.771 | 1.537 | 1.228 |
| | **Immateriell støðisogn tilsamans** | | **1.809** | **1.771** | **1.537** | **1.228** |
| 8 | Flogfør og viðlíkahald | | 207.680 | 237.358 | 207.680 | 237.356 |
| 9 | Grundøki og bygningar | | 106.255 | 108.464 | 76.371 | 62.128 |
| 10 | Annar útbúnaður, rakstrargøgn og innbúgv | | 249.159 | 236.067 | 207.559 | 204.809 |
| 11 | Forútgjøld | | 41.276 | 16.567 | 41.276 | 16.568 |
| 12 | Eykalutir | | 728 | 1.116 | 728 | 1.116 |
| | **Materiell støðisogn tilsamans** | | **605.098** | **599.572** | **533.614** | **521.977** |
| 13 | Kapitalpartar í atknýttum fyritøkum | | 0 | 0 | 73.115 | 24.981 |
| 14 | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | | 43.960 | 24.648 | 14.420 | 14.056 |
| 15 | Ábyrgdarlán | | 0 | 12.800 | 0 | 0 |
| | **Fíggjarlig støðisogn tilsamans** | | **43.960** | **37.448** | **87.535** | **39.037** |
| | **Støðisogn tilsamans** | | **650.867** | **638.791** | **622.686** | **562.242** |

| | | KONSERN | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|
| *Nota* | *Ogn* *(kr. 1.000)* | 2025 | 2024 | 2025 | 2024 |
| | **Ogn í umferð** | | | | |
| | Vørugoymsla | 1.466 | 855 | 198 | 143 |
| | **Vørugoymslur tilsamans** | **1.466** | **855** | **198** | **143** |
| | Vøru- og tænastuáogn | 39.680 | 23.783 | 32.535 | 18.944 |
| | Áogn hjá atknýttum fyritøkum | 0 | 0 | 645 | 45.769 |
| | Áogn hjá assosieraðum fyritøkum | 1.105 | 983 | 268 | 697 |
| *16* | Útsett skattaáogn | 4.603 | 3.243 | 0 | 0 |
| | Onnur áogn | 19.837 | 42.895 | 21.381 | 39.464 |
| *17* | Tíðaravmarkingar | 18.465 | 18.654 | 18.442 | 18.639 |
| | **Áogn tilsamans** | **83.690** | **89.558** | **73.271** | **123.513** |
| | Onnur partabrøv | 27 | 27 | 27 | 27 |
| | **Virðisbrøv tilsamans** | **27** | **27** | **27** | **27** |
| | Tøkur peningur | 54.431 | 141.186 | 50.513 | 137.971 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **139.614** | **231.626** | **124.009** | **261.654** |
| | **OGN TILSAMANS** | **790.481** | **870.417** | **746.695** | **823.896** |

| | | KONSERN | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|
| *Nota* | *Skyldur* *(kr. 1.000)* | 2025 | 2024 | 2025 | 2024 |
| | **Eginogn** | | | | |
| *18* | Felagskapitalur | 104.500 | 104.500 | 104.500 | 104.500 |
| | Grunnur fyri uppskrivingar | 1.640 | 1.640 | 1.640 | 1.640 |
| | Grunnur fyri nettoopskriving eftir innaravirðisháttinum | 181 | 11.955 | 181 | 11.955 |
| | Grunnur til avleidd fíggjarlig amboð | -12.850 | -5.143 | -12.850 | -5.143 |
| | Flutt úrslit | 179.859 | 224.332 | 179.859 | 224.332 |
| | **Eginogn tilsamans** | **273.330** | **337.284** | **273.330** | **337.284** |
| | **Avsettar skyldur** | | | | |
| *19* | Avsett til útsettan skatt | 18.154 | 35.604 | 18.154 | 35.604 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **18.154** | **35.604** | **18.154** | **35.604** |
| | **Skuld** | | | | |
| | Veðlán | 269.648 | 301.539 | 240.288 | 267.628 |
| **20** | **Langfreistað skuld tilsamans** | **269.648** | **301.539** | **240.288** | **267.628** |
| *21* | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 33.453 | 29.847 | 28.346 | 24.865 |
| | Vøru og tænastuskuld | 47.027 | 46.829 | 44.194 | 43.669 |
| | Skuld til atknýttar fyritøkur | 0 | 0 | 330 | 847 |
| | Skuld til assosieraðar fyritøkur | 0 | 13 | 0 | 13 |
| | Onnur skuld | 62.690 | 52.659 | 55.874 | 47.344 |
| *22* | Tíðaravmarkingar | 70.509 | 60.370 | 70.509 | 60.370 |
| *23* | Avleidd fíggjarlig amboð | 15.670 | 6.272 | 15.670 | 6.272 |
| | **Stuttfreistað skuld tilsamans** | **229.349** | **195.990** | **214.923** | **183.380** |
| | **Skuld tilsamans** | **498.997** | **497.529** | **455.211** | **451.008** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **790.481** | **870.417** | **746.695** | **823.896** |
| **2** | **Samsýning til valdan grannskoðara** | | | | |
| **23** | **Veðsetingar og trygdarveitingar** | | | | |

| (kr. 1.000) | KONSERN<br>Felags-kapitalur | Grunnur fyri uppskrivingar | Grunnur fyri nettouppskrivingar eftir innaravirðisháttinum | Grunnur til avleidd fíggjarlig amboð | Flutt úrslit | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2024** | **104.500** | **1.640** | **12.472** | **-1.227** | **196.520** | **313.905** |
| Flutt úrslit í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 | 27.295 | 27.295 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 9.483 | 0 | -9.483 | 0 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -10.000 | 0 | 10.000 | 0 |
| Virðisjavnan av avleiddum fíggjarligum amboðum | 0 | 0 | 0 | -3.916 | 0 | -3.916 |
| **Eginogn 1. januar 2025** | **104.500** | **1.640** | **11.955** | **-5.143** | **224.332** | **337.284** |
| Rætting til primo | 0 | 0 | -7.518 | 0 | 7.518 | 0 |
| Flutt úrslit í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 | -56.248 | -56.248 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 6.744 | 0 | -6.744 | 0 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -11.000 | 0 | 11.000 | 0 |
| Virðisjavnan av avleiddum fíggjarligum amboðum | 0 | 0 | 0 | -7.707 | 0 | -7.707 |
| | **104.500** | **1.640** | **181** | **-12.850** | **179.859** | **273.330** |

| (kr. 1.000) | MÓÐURFELAG<br>Felags-kapitalur | Grunnur fyri uppskrivingar | Grunnur fyri nettouppskrivingar eftir innaravirðisháttinum | Grunnur til avleidd fíggjarlig amboð | Flutt úrslit | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2024** | **104.500** | **1.640** | **12.472** | **-1.227** | **196.520** | **313.905** |
| Flutt úrslit í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 | 27.295 | 27.295 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 9.483 | 0 | -9.483 | 0 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -10.000 | 0 | 10.000 | 0 |
| Virðisjavnan av avleiddum fíggjarligum amboðum | 0 | 0 | 0 | -3.916 | 0 | -3.916 |
| **Eginogn 1. januar 2025** | **104.500** | **1.640** | **11.955** | **-5.143** | **224.332** | **337.284** |
| Rætting til primo | 0 | 0 | -7.518 | 0 | 7.518 | 0 |
| Flutt úrslit í árinum | 0 | 0 | 0 | 0 | -56.247 | -56.247 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 6.744 | 0 | -6.744 | 0 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -11.000 | 0 | 11.000 | 0 |
| Virðisjavnan av avleiddum fíggjarligum amboðum | 0 | 0 | 0 | -7.707 | 0 | -7.707 |
| | **104.500** | **1.640** | **181** | **-12.850** | **179.859** | **273.330** |

| | | KONSERN | |
|---|---|---|---|
| *Nota* | *(kr. 1.000)* | 2025 | 2024 |
| | **Ársúrslit** | **-56.247** | **27.295** |
| *24* | Javningar | 58.518 | 42.186 |
| *25* | Broyting í rakstrarpeningi | 27.565 | -26.798 |
| | Pengastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar | 29.836 | 42.683 |
| | Pengastreymar frá vanligum rakstri | 29.836 | 42.683 |
| | **Pengastreymar frá rakstri** | **29.836** | **42.683** |
| | Keyp av immateriellari støðisogn | -524 | -1.274 |
| | Keyp av materiellari støðisogn | -71.904 | -147.296 |
| | Søla av materiellari støðisogn | 1.632 | 890 |
| | Keyp av fíggjarligari støðisogn | -17.510 | -305 |
| | **Pengastreymar frá íløgum** | **-88.306** | **-147.985** |
| | Upptøka av langfreistaðari skuld | 0 | 111.726 |
| | Avdráttir av langfreistaðari skuld | -28.285 | -28.052 |
| | **Pengastreymar frá fígging** | **-28.285** | **83.674** |
| | **Broyting í tøkum peningi** | **-86.755** | **-21.628** |
| | Tøkur peningur við ársbyrjan | 141.186 | 162.814 |
| | **Tøkur peningur við árslok** | **54.431** | **141.186** |
| | **Tøkur peningur** | | |
| | Tøkur peningur | 54.431 | 141.186 |
| | **Tøkur peningur við árslok** | **54.431** | **141.186** |

## Notur


**1.** Segmentbýti og útgreining av ferðafólkatali ........................ 45

**2.** Samsýning til valdan grannskoðara ................................ 46
**3.** Starvsfólkakostnaðir

**4.** Aðrar fíggjarligar inntøkur ............................................. 47
**5.** Aðrir fíggjarligir kostnaðir
**6.** Skattur av ársúrsliti
**7.** Ritbúnaður

**8.** Flogfør og viðlíkahald .................................................. 48
**9.** Grundøki og bygningar

**10.** Annar útbúnaður, rakstrargøgn og innbúgv ........................ 49
**11.** Forútgjøld
**12.** Eykalutir

**13.** Kapitalpartar í atknýttum fyritøkum ................................. 50

**14.** Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum .............................. 51
**15.** Ábyrgdarlán

**16.** Útsett skattaáogn........................................................ 52
**17.** Tíðaravmarkingar
**18.** Felagskapitalur
**19.** Avsett til útsettan skatt

**20.** Skyldur.................................................................... 53
**21.** Avleidd fíggjarlig amboð
**22.** Tíðaravmarkingar

**23.** Veðsetingar og trygdarveitingar ...................................... 54

**24.** Javningar ................................................................. 55
**25.** Broyting í rakstrarpeningi

| 1. SEGMENTBÝTI – KONSERN | FLOGFØR V.M. | | TYRLUR | | GISTINGARHÚS-VIRKSEMI | | KONSERNIN TILS. | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **(Kr. 1.000)** | **2025** | **2024** | **2025** | **2024** | **2025** | **2024** | **2025** | **2024** |
| Inntøka tils. | 829.225 | 810.975 | 49.527 | 48.570 | 68.054 | 62.175 | 946.806 | 921.343 |
| Rakstrarkostnaður tils. | 876.898 | 770.591 | 57.058 | 54.427 | 86.188 | 66.522 | 1.020.144 | 891.538 |
| Úrslit áðrenn skatt | -47.673 | 40.007 | -7.531 | -5.857 | -18.134 | -4.347 | -73.338 | 29.805 |
| Skattur | 14.402 | -4.831 | 1.356 | 1.042 | 1.311 | 1.280 | 17.069 | -2.509 |
| **Úrslit** | **-33.271** | **35.176** | **-6.175** | **-4.815** | **-16.823** | **-3.067** | **-56.269** | **27.296** |

| GEOGRAFISK VIRKISØKIR | FØROYAR | | EUROPA | | | | TILSAMANS | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Nettoinntøkan stavar frá hesum marknaðum:* | *2025* | *2024* | *2025* | *2024* | | | *2025* | *2024* |
| **Inntøka tilsamans** | **697.897** | **660.119** | **248.909** | **261.224** | | | **946.806** | **921.343** |

Inntøkur frá Europiskum virkisøki er tað, ið ikki er skrásett sum virksemi í ella við Føroyum sum endamáli. S.s. charter o.l. uttanlands.

| 1. SEGMENTBÝTI – MÓÐURFELAG | FLOGFØR V.M. | | TYRLUR | | | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **(Kr. 1.000)** | **2025** | **2024** | **2025** | **2024** | | | **2025** | **2024** |
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | | | | |
| Inntøka tils. | 829.225 | 810.598 | 49.527 | 48.570 | | | 878.752 | 859.168 |
| Rakstrarkostnaður tils. | 876.898 | 770.591 | 57.058 | 54.427 | | | 933.956 | 825.018 |
| Úrslit áðrenn skatt | -47.673 | 40.007 | -7.531 | -5.857 | | | -55.204 | 34.150 |
| Skattur | 14.402 | -4.831 | 1.356 | 1.042 | | | 15.758 | -3.789 |
| **Úrslit** | **-33.271** | **35.176** | **-6.175** | **-4.815** | | | **-39.446** | **30.361** |

| GEOGRAFISK VIRKISØKIR | FØROYAR | | EUROPA | | | | TILSAMANS | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Nettoinntøkan stavar frá hesum marknaðum:* | *2025* | *2024* | *2025* | *2024* | | | *2025* | *2024* |
| **Inntøka tilsamans** | **629.843** | **597.944** | **248.909** | **261.224** | | | **878.752** | **859.168** |

| Útgreining av ferðafólkatali | ATLANTIC AIRWAYS 2025 | 2024 |
|---|---|---|
| Ferðafólk flogfør, ruta | 378.913 | 368.696 |
| Ferðafólk flogfør, leigutúrar | 165.506 | 173.696 |
| **Ferðafólk flogfør** | **544.419** | **542.392** |
| Ferðafólk tyrlur | 10.665 | 10.973 |
| **Ferðafólk tilsamans** | **555.084** | **553.365** |
| **Blokktímar** | | |
| Flogfør, ruta | 6.460 | 6.723 |
| Flogfør, leigutúrar | 4.287 | 4.410 |
| **Flúgvitímar flogfør** | **10.747** | **11.134** |

| | KONSERN | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|
| *(kr. 1.000)* | 2025 | *2024* | 2025 | *2024* |
| **2. Samsýning til valdan grannskoðara** | | | | |
| Samlað samsýning til P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki | 456 | 365 | 372 | 289 |
| Samsýning viðv. lógarkravdari grannskoðan | 212 | 201 | 128 | 125 |
| Onnur ráðgeving | 244 | 164 | 244 | 164 |
| | **456** | **365** | **372** | **289** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **3. Starvsfólkakostnaðir** | | | | |
| Lønir | 175.615 | 156.680 | 147.254 | 133.454 |
| Eftirlønir | 20.038 | 16.797 | 16.720 | 14.152 |
| Onnur almenn gjøld | 8.230 | 7.251 | 6.869 | 6.135 |
| | **203.883** | **180.728** | **170.843** | **153.741** |
| Stjórn | 2.433 | 3.013 | 2.433 | 3.013 |
| Nevnd | 1.300 | 1.300 | 1.060 | 1.060 |
| | **3.733** | **4.313** | **3.493** | **4.073** |
| Starvsfólk í miðal | 307 | 280 | 229 | 214 |

Løn til stjórn í 2025 umfatar løn til tveir stjórar í 4 mánaðir og ein stjóra í 8 mánaðir.
Løn til stjórn í 2024 umfatar løn til tveir stjórar.

| | KONSERN | | MÓÐURFELAG | |
|---|---|---|---|---|
| *(kr. 1.000)* | 2025 | *2024* | 2025 | *2024* |
| **4. Aðrar fíggjarligar inntøkur** | | | | |
| Aðrar fíggjarinntøkur | 1.446 | 4.748 | 835 | 2.025 |
| Gjaldoyrakursmunir | 0 | 13 | -2 | 13 |
| Rentur, atknýttar fyritøkur | 0 | 0 | 0 | 979 |
| | **1.446** | **4.761** | **833** | **3.017** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **5. Aðrir fíggjarligir kostnaðir** | | | | |
| Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 18.846 | 11.300 | 17.247 | 8.984 |
| | **18.846** | **11.300** | **17.247** | **8.984** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **6. Skattur av ársúrsliti** | | | | |
| Broyting í útsettum skatti | -17.091 | 2.509 | -15.758 | 3.789 |
| | **-17.091** | **2.509** | **-15.758** | **3.789** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **7. Ritbúnaður** | | | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 23.235 | 21.960 | 22.391 | 21.356 |
| Tilgongd í árinum | 524 | 1.274 | 524 | 1.034 |
| **Útveganarvirði við árslok** | **23.759** | **23.234** | **22.915** | **22.390** |
| Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan | -21.462 | -21.132 | -21.162 | -20.957 |
| Ársins av /niðurskrivingar | -488 | -331 | -216 | -205 |
| **Av- og niðurskrivingar við árslok** | **-21.950** | **-21.463** | **-21.378** | **-21.162** |
| **Roknskaparligt virði við árslok** | **1.809** | **1.771** | **1.537** | **1.228** |

| (kr. 1.000) | KONSERN 2025 | KONSERN 2024 | MÓÐURFELAG 2025 | MÓÐURFELAG 2024 |
|---|---|---|---|---|
| **8. Flogfør og viðlíkahald** | | | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 478.879 | 477.038 | 478.879 | 477.037 |
| Tilgongd í árinum | 14.765 | 1.841 | 14.765 | 1.841 |
| **Útveganarvirði við árslok** | **493.644** | **478.879** | **493.644** | **478.878** |
| Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan | -241.522 | -211.467 | -241.522 | -211.468 |
| Ársins av- og niðurskrivingar | -44.442 | -30.054 | -44.442 | -30.054 |
| **Av- og niðurskrivingar við árslok** | **-285.964** | **-241.521** | **-285.964** | **-241.522** |
| **Roknskaparligt virði við árslok** | **207.680** | **237.358** | **207.680** | **237.356** |

| | *31/12 2025* | *31/12 2024* | *31/12 2025* | *31/12 2024* |
|---|---|---|---|---|
| **9. Grundøki og bygningar** | | | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 134.516 | 82.378 | 87.660 | 52.177 |
| Tilgongd í árinum | 772 | 36.798 | 10.087 | 20.142 |
| Frágongd í árinum | -1.632 | 0 | 0 | 0 |
| Flytingar | 0 | 15.341 | 5.300 | 15.341 |
| **Útveganarvirði við árslok** | **133.656** | **134.517** | **103.047** | **87.660** |
| Uppskrivingar við ársbyrjan | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| **Uppskrivingar við árslok** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **2.000** |
| Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan | -28.054 | -27.135 | -27.532 | -27.136 |
| Ársins av /niðurskrivingar | -1.347 | -918 | -1.144 | -396 |
| **Av- og niðurskrivingar við árslok** | **-29.401** | **-28.053** | **-28.676** | **-27.532** |
| **Roknskaparligt virði við árslok** | **106.255** | **108.464** | **76.371** | **62.128** |

| (kr. 1.000) | KONSERN 2025 | KONSERN 2024 | MÓÐURFELAG 2025 | MÓÐURFELAG 2024 |
|---|---|---|---|---|
| **10. Annar útbúnaður, rakstrargøgn og innbúgv** | | | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 293.773 | 98.179 | 245.073 | 54.179 |
| Tilgongd í árinum | 31.659 | 100.481 | 20.529 | 95.781 |
| Frágongd í árinum | 0 | -1.893 | 0 | -1.893 |
| Flytingar | 0 | 97.006 | -5.300 | 97.006 |
| **Útveganarvirði við árslok** | **325.432** | **293.773** | **260.302** | **245.073** |
| Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan | -57.706 | -49.286 | -40.265 | -36.397 |
| Ársins av /niðurskrivingar | -18.567 | -9.423 | -12.478 | -4.870 |
| Av /niðurskrivingar, avhendaðar ognir | 0 | 1.003 | 0 | 1.003 |
| **Av- og niðurskrivingar við árslok** | **-76.273** | **-57.706** | **-52.743** | **-40.264** |
| **Roknskaparligt virði við árslok** | **249.159** | **236.067** | **207.559** | **204.809** |

| | *31/12 2025* | *31/12 2024* | *31/12 2025* | *31/12 2024* |
|---|---|---|---|---|
| **11. Forútgjøld** | | | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 16.568 | 120.739 | 16.568 | 120.739 |
| Tilgongd í árinum | 24.708 | 8.175 | 24.708 | 8.176 |
| Flytingar | 0 | -112.347 | 0 | -112.347 |
| **Útveganarvirði við árslok** | **41.276** | **16.567** | **41.276** | **16.568** |
| **Roknskaparligt virði við árslok** | **41.276** | **16.567** | **41.276** | **16.568** |

Forútgjøld í fíggjarstøðuni er til keyp av tveimum Airbus A320neo flogførum, sum verða latin í 2027 og 2028.

| **12. Eykalutir** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 3.944 | 3.944 | 3.944 | 3.944 |
| **Útveganarvirði við árslok** | **3.944** | **3.944** | **3.944** | **3.944** |
| Av- og niðurskrivingar við ársbyrjan | -2.828 | -2.488 | -2.828 | -2.488 |
| Avskrivingar í árinum | -388 | -340 | -388 | -340 |
| **Av- og niðurskrivingar við árslok** | **-3.216** | **-2.828** | **-3.216** | **-2.828** |
| **Roknskaparligt virði við árslok** | **728** | **1.116** | **728** | **1.116** |

| (kr. 1.000) | KONSERN 31/12 2025 | KONSERN 31/12 2024 | MÓÐURFELAG 31/12 2025 | MÓÐURFELAG 31/12 2024 |
|---|---|---|---|---|
| **13. Kapitalpartar í atknýttum fyritøkum** | | | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 0 | 0 | 32.500 | 25.500 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 52.754 | 7.000 |
| **Útvegnarvirði við árslok** | **0** | **0** | **85.254** | **32.500** |
| Uppskrivingar við ársbyrjan | 0 | 0 | -7.519 | -4.404 |
| Javning av áður gjørdum uppskrivingum | 0 | 0 | 16 | 0 |
| Ársúrslit, áðrenn avskrivingar av goodwill | 0 | 0 | -4.636 | -3.115 |
| **Uppskrivingar við árslok** | **0** | **0** | **-12.139** | **-7.519** |
| **Roknskaparligt virði við árslok** | **0** | **0** | **73.115** | **24.981** |

Høvuðstølini hjá fyritøkunum sambært seinast góðkendu ársfrásøgnunum

| *(kr. 1.000)* | *Ognarpartur* | *Eginogn* | *Ársúrslit* | *Roknskaparligt virði hjá Atlantic Airways P/F* |
|---|---|---|---|---|
| P/F Hotel Atlantic, Sørvágur | 100 % | 43.052 | -4.537 | 43.052 |
| P/F Ognarfelagið matr nr. 406b, Sørvágur | 100 % | 30.063 | -98 | 30.063 |
| | | **73.115** | **-4.635** | **73.115** |

| (kr. 1.000) | | KONSERN 31/12 2025 | KONSERN 31/12 2024 | MÓÐURFELAG 31/12 2025 | MÓÐURFELAG 31/12 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| **14.** | **Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum** | | | | |
| | Útveganarvirði við ársbyrjan | 5.301 | 4.995 | 2.101 | 1.795 |
| | Tilgongd í árinum | 17.510 | 306 | 0 | 306 |
| | **Útveganarvirði við árslok** | **22.811** | **5.301** | **2.101** | **2.101** |
| | Uppskrivingar við ársbyrjan | 19.347 | 17.761 | 11.955 | 12.472 |
| | Javning av áður gjørdum uppskrivingum | 305 | 0 | 305 | 0 |
| | Ársúrslit | 12.497 | 11.586 | 11.059 | 9.483 |
| | Vinningsbýti | -11.000 | -10.000 | -11.000 | -10.000 |
| | **Uppskrivingar við árslok** | **21.149** | **19.347** | **12.319** | **11.955** |
| | **Roknskaparligt virði við árslok** | **43.960** | **24.648** | **14.420** | **14.056** |

Høvuðstølini hjá fyritøkunum sambært seinast góðkendu ársfrásøgnunum

| *(kr. 1.000)* | *Ognarpartur* | *Eginogn* | *Ársúrslit* | *Roknskaparligt virði hjá Atlantic Airways P/F* |
|---|---|---|---|---|
| P/F Duty Free, Flogvøllurin, 380 Sørvágur | 50% | 24.611 | 21.994 | 12.305 |
| P/F Greengate Incomming, Niels Winthersgøta 5, 100 Tórshavn | 49% | 2.857 | 307 | 1.400 |
| P/F Gjáargarður, Dalavegur 20, 476 Gjógv | 30,5% | 2.343 | -289 | 715 |
| | | **29.811** | **22.012** | **14.420** |

| (kr. 1.000) | | KONSERN 31/12 2025 | KONSERN 31/12 2024 | MÓÐURFELAG 31/12 2025 | MÓÐURFELAG 31/12 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| **15.** | **Útveganarvirði við ársbyrjan** | **12.800** | **12.800** | **0** | **0** |
| | Uppgjørt í árinum | -12.800 | 0 | 0 | 0 |
| | Útveganarvirði við árslok | 0 | 12.800 | 0 | 0 |
| | **Roknskaparligt virði við árslok** | **0** | **12.800** | **0** | **0** |
| | **Áogn P/F Ognarfelagið matr.nr. 1332e** | **0** | **12.800** | **0** | **0** |

| (kr. 1.000) | KONSERN 31/12 2025 | KONSERN 31/12 2024 | MÓÐURFELAG 31/12 2025 | MÓÐURFELAG 31/12 2024 |
|---|---|---|---|---|
| **16. Útsett skattaáogn** | | | | |
| Útsett skattaáogn við ársbyrjan | 3.243 | 2.137 | 0 | 174 |
| Útsettur skattur í árinum | 1.360 | 1.280 | 0 | 0 |
| Útsettur skattur bókað beinleiðis á eginognina | 0 | -174 | 0 | -174 |
| | **4.603** | **3.243** | **0** | **0** |

| | KONSERN 31/12 2025 | KONSERN 31/12 2024 | MÓÐURFELAG 31/12 2025 | MÓÐURFELAG 31/12 2024 |
|---|---|---|---|---|
| **17. Tíðaravmarkingar** | | | | |
| Aðrar tíðaravmarkingar | 18.465 | 18.654 | 18.442 | 18.639 |
| | **18.465** | 18.654 | **18.442** | 18.639 |

| | KONSERN 31/12 2025 | KONSERN 31/12 2024 | MÓÐURFELAG 31/12 2025 | MÓÐURFELAG 31/12 2024 |
|---|---|---|---|---|
| **18. Felagskapitalur** | | | | |
| Felagskapitalur við ársbyrjan | 104.500 | 104.500 | 104.500 | 104.500 |
| | **104.500** | **104.500** | **104.500** | **104.500** |

Felagskapitalurin kr. 104.500.000 er lutaður sundur í 1.045.000 partabrøv. Partapeningurin er ikki býttur í flokkar. Ongar rørslur hava verið á felagskapitalinum seinastu fimm árini.

Felagið eigur eginpartabrøv áljóðandi nominelt t.kr. 34.155 svarandi til 33%.

| | KONSERN 31/12 2025 | KONSERN 31/12 2024 | MÓÐURFELAG 31/12 2025 | MÓÐURFELAG 31/12 2024 |
|---|---|---|---|---|
| **19. Avsett til útsettan skatt** | | | | |
| Avsett til útsettan skatt við ársbyrjan | 35.604 | 32.849 | 35.604 | 32.849 |
| Útsettur skattur í árinum | -15.758 | 3.789 | -15.758 | 3.789 |
| Skattur innroknaður í eginognina | -1.692 | -1.034 | -1.692 | -1.034 |
| | **18.154** | **35.604** | **18.154** | **35.604** |

| (kr. 1.000) | KONSERN 31/12 2025 | KONSERN 31/12 2024 | MÓÐURFELAG 31/12 2025 | MÓÐURFELAG 31/12 2024 |
|---|---|---|---|---|
| **20. Skyldur** | Skuld tilsamans 31/12 2025 | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | Langfreistað skuld 31/12 2025 | Restskuld aftaná 5 ár |
| **KONSERN** | | | | |
| Veðlán | 303.101 | 33.453 | 269.648 | 0 |
| | **303.101** | **33.453** | **269.648** | **0** |
| **MÓÐURFELAG** | | | | |
| Veðlán | 268.634 | 28.346 | 240.288 | 0 |
| | **268.634** | **28.346** | **240.288** | **0** |

| (kr. 1.000) | KONSERN 31/12 2025 | KONSERN 31/12 2024 | MÓÐURFELAG 31/12 2025 | MÓÐURFELAG 31/12 2024 |
|---|---|---|---|---|
| **21. Avleidd fíggjarlig amboð** | | | | |
| Swap flytingar (brennievni) | 15.670 | 6.272 | 15.670 | 6.272 |
| | **15.670** | **6.272** | **15.670** | **6.272** |
| | | | | |
| **22. Tíðaravmarkingar** | | | | |
| Forútgjøld, ferðaseðlar | 70.509 | 60.370 | 70.509 | 60.370 |
| | **70.509** | **60.370** | **70.509** | **60.370** |

## 23. Veðsetingar og trygdarveitingar

### MÓÐURFELAG

Flogfør og tyrlur við einum bókaðum virði pr. 31. desember 2025 á 208 mió. kr. eru veðsett fyri 507 mió kr.

Felagið hevur tríggjar operationell leasing sáttmálar. Hesir viðv. tveimum A320neo flogførum og eitt A320.

Leasingskyldurnar eru hesar:
Í 2025: 59,9 mió. kr.
Aftaná 5 ár: 0 mió kr

Felagið hevur tryggjað lángevarum hjá assoseraðum felag, at rakstur og gjaldføri hjá dótturfelag eru nøktandi til at halda virksemið hjá dótturfelagi gangandi í 6 ár frá 01.01.2021

Felagið hevur veitt ábyrgdir fyri 2,6 mio kr.

Av tøkum peningi er 2,5 mió kr. veðsettar

Felagið leigar hølir til umsiting frá Vága Floghavn í terminal bygninginum. Árliga leigugjaldið er 0,8 mió kr.

Felagið hevur gjørt avtalu við Airbus verksmiðjuna, um at keypa tvey A320 neo flogfør. Tað fyrra verður latið í 2027, og tað seinna í 2028.

Sum trygd fyri skuld til lánistovn, hevur felagið latið veð á nominelt 100 mió. kr. í matr. 422ab Sørvágur, sum hevur roknskaparligt virði pr. 31.12.2025 á 55,7 mió. kr.

Eftir roknskaparlok er felagið meldað til Føroya Landfúta av Dátueftirlitinum, við kravi um sekt uppá 14 mió.kr. P/F Atlantic Airways er ikki samt við niðurstøðuni hjá Dátueftirlitinum.

Felagið er móðurfelag í samskatting og ábyrgdist fyri skattakrøv og rentur hjá samskattaðu feløgunum.

### KONSERN

P/F Hotel Atlantic hevur gjørt sáttmála um at leiga bygning í Havn frá P/F Ognarfelagið matr.nr. 1332e. Leigusáttmálin kann sigast upp við skrivligari fráboðan á 24 mánaðir, tó í fyrsta lagið 20 ár eftir, at sáttmálin kom í gildið, sum er í 2020.

Sum trygd fyri skuld til lánistovn, hevur P/F Hotel Atlantic latið virkisveð á nominelt 30 mió. kr. Virkisveðið umfatar vøru og tænastuáogn, goymslur, rakstrarinventar og rakstrarambоð og loyvir, sum hava eitt roknskaparligt virði pr. 31.12.2025 á 28.120 t.kr

| (kr.1.000) | KONSERN 2025 | 2024 |
|---|---|---|
| **24. Javningar** | | |
| Av- og niðurskrivingar av materiellari og immateriellari støðisogn | 65.232 | 41.087 |
| Inntøkur frá kapitalpartum í assosieraðum fyritøkum | -13.423 | -11.585 |
| Vinningsbýti frá assosieraðum fyritøkum | 11.000 | 10.000 |
| Ábyrgdarlán afturgoldið | 12.800 | 0 |
| Útsettur skattur | -17.091 | 2.684 |
| | **58.518** | **42.186** |

| | | |
|---|---|---|
| **25. Broyting í rakstrarpeningi** | | |
| Broyting í vørugoymslum | -611 | -308 |
| Broyting í áogn | 18.424 | -25.890 |
| Broyting í vøru- og tænastuskuld og aðrari skuld | 9.170 | -405 |
| Aðrar broytingar í rakstrarpeningi | 582 | -195 |
| | **27.565** | **-26.798** |

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways Vága Floghavn FO-380 Sørvágur Føroyar +298 34 10 00 atlantic.fo